# GERÐABÓK

**Dato:** **14. desember 2011** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:260/11-304/11**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Rúni Djurhuus
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Annfinn Brekkstein
Elin Lindenskov
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Inga Dahl
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria H. Olsen, sum hevur farloyvi

**LUTTÓKU EISINI:**

Jóan Petur Hentze

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**264/11** **2011-0217**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 14. desember 2011:** Tikið til eftirtektar.

**265/11** **2011-0662**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 24. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. apríl 2011**: Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mars 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:**Trivnaðarstjórin greiddi frá útvaldum konto. Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri apríl 2011 verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mai og juni 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Trivnaðarstjorin greiddi frá útvaldum konto. Framlagt og góðkent.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri juli og august 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. september 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Roknskapurin fyri september 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 27. oktober 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Roknskapurin fyri oktober 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Útsett.

Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. desember 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**266/11** **<u>2011-2500</u>**

**<u>Umbøn um eykajáttan til Skúlan við Løgmannabreyt</u>**

**Lýsing av málinum**
Skúlin við Løgmannabreyt er ein 2-sporaður skúli frá 1. - 9. flokk og er tikin í nýtslu í stigum.

1. byggistig varð liðugt í august 2008. Tá vóru næmingar í 1. til 3. flokki innskrivaðir í skúlan, og húsaðust teir í teimum fimm skúlastovunum í heimrust C og D. Skúlaárið 2009/2010 varð heimrust B tikin í nýtslu, og tá vóru næmingar í 1. - 7. flokki í skúlanum.

Á heysti í 2009 vórðu miðhøllin, námsfrøðiligi tænastudepilin og fimleikarhøllin liðug. Um somu tíð vórðu fakhølini: smíð, evning, alis-/evnafrøði, náttúra og tøkni, handarbeiði og tónleikastovurnar tiknar í nýtslu.

Skúlaárið 2010/2011 varð heimrust A tikin í nýtslu og 8. flokkur byrjaði í skúlanum. Skúlakøkurin varð tikin í nýtslu í oktober í 2010.

Árini 2009 og 2010 hevur skúlin keypt útgerð og amboð til skúlan til serlærugreinarnar. Hesar útreiðslur eru farnar av rakstrarjáttanini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt, hesum er hædd ikki tikin fyri í játtanini, og tískil er skúlin komin í ta støðu, at hann hevur eina meirnýtslu á góðar 2 mió kr.

Í verkætlanini er ikki sett av til hesa útgerð og hesi amboð, men nú verkætlanin verður lokað, verður biðið um, at upphæddin til útgerð og amboð, sum Skúlin við Løgmannabreyt hevur goldið av rakstrinum, verður endurrindað skúlanum av verkætlanini.

Skúlin við Løgmannabreyt hevur tær serstovur, sum eiga at vera í einum skúla. Fyri at kunna undirvísa í serstovunum er neyðugt, at amboð og útgerð eru til taks. Skúlin hevur keypt útgerð og amboð til hesar serstovur: tónleik, handarbeiði, heimkunnleika, alis-/evnafrøði, náttúru og tøkni, lívfrøði og fimleikahøll. Haraftrat hevur skúlin keypt amboð og útgerð til KT. Útreiðslurnar árini 2009 og 2010 fyri amboð og útgerð til nevndu serstovur og KT eru hesar:

| | |
|---:|---:|
| 2009 | 859.168 |
| 2010 | 1.733.707 |
| útr. Í alt | **2.592.875** |

Við árslok 2011 verður meirnýtslan hjá Skúlanum við Løgmannabreyt væntandi knappar 3 mió kr. Mett verður, at við eini eykajáttan samsvarandi útreiðslunum til útgerð og amboð til serstovurnar og KT, megnar skúlin at fáa javnvág í raksturin aftur við árslok 2013. Biðið verður tí um, at skúlanum verður veitt ein eykajáttan á 2.600.000 kr, og at upphæddin verður játtað av restupphæddini av verkætlan L 41005 - Skúlin við Løgmannabreyt.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at veita Skúlanum við Løgmannabreyt eina eykajáttan á 2.600.000 kr., og at upphæddin verður játtað av restupphæddini av verkætlan L 41005 - Skúlin við Løgmannabreyt.

**Mentamálanevndin 14. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Játtanin til verkætlanina til Skúlan við Løgmannabreyt L 41005 er dagførd, og eftir á verkætlanini verða 2.029.000 kr. Sostatt vanta 563.875 kr. í til útreiðslurnar fyri amboð og útgerð til skúlan við Løgmannabreyt. biðið verður tí um, at henda upphædd verður veitt av Konto 4175, Dagføring av skúlum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at veita Skúlanum við Løgmannabreyt eina eykajáttan á 2.592.875 kr. og at upphæddin verður játtað av restupphæddini av verkætlan L 41005, Skúlin við Løgmannabreyt og av konto 4175, Dagføring av skúlum, við ávikavist 2.029.000 kr. og 563.875 kr.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**267/11** **2011-0731**

**Framfluttar játtanir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2010 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2011.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2010.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta framflyting av t.kr. 31.470, netto, til rakstur og t.kr. 123.046, netto, til íløgur.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Aftaná at ársroknskapurin var endaliga liðugur og grannskoðaður, vóru nakrar broytingar í framfluttu játtanunum, soleiðis at
Framfluttar rakstrarjáttanir netto eru tkr. 31.756
Framfluttar íløgujáttanir netto eru tkr. 119.726

**Tilmæli:**
Fìggjarleiðarin og miðfyrisitingarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við ískoytinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**268/11** **2006-0036 FNJ**

**Stuðul til umhvørvistiltøk**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fyri at menna vitan/tiltøk innan umhvørvið í Tórshavnar kommunu, verður skotið upp, at heilsu- og umhvørvisnevndin kann veita stuðul til umhvørvisverkætlanir, sum eru til gagns fyri umhvørvið í Tórshavnar kommunu. Hetta kundi t.d. verið agenda 21 verkætlanir, herundir grønar skúlar v.m. Stuðul kann verða givin til stovnar, virkir, feløg og einstaklingar.

Í hesum sambandi skal støða verða tikin til:
- Hvussu tiltakið skal fíggjast
- Hvussu stór upphædd skal játtast pr. ár
- Endamál við játtanini
- Stuðulstreytir

Neyðugt er, at ein reglugerð ella vegleiðing verður gjørd fyri veitan av stuðli til umhvørvisverndartiltøk, sí hjáløgdu reglugerð frá Innlendismálaráðnum.

Nevnast kann, at Keypmannahavnar kommuna m.a. hevur eina agenda 21 pulju, sum veitir stuðul til verkætlanir, sum m. a. kunnar og rágevir brúkaran um umhvørvisvinarlig innkeyp og um umhvørvið, stuðlar umhvørvisbløðum, kunnandi

heimasíðum, fyrilestrum og kampagnum um umhvørvið, útbúgving av ráðgevum innan burturkast v.m.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum og at eitt uppskot til eina vegleiðing verður gjørd.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. januar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum um at gera eina reglugerð at leggja fyri nevndina aftur.

Nevndin samtykti eisini, at kommunan søkir Innlendismálaráðið um stuðul sambært § 2 í galdandi reglugerð fyri stuðul av játtanini til umhvørvis- og náttúru-verndartiltøk til umhvørvisvikuna 2006.

**Ískoyti:**
Uppskot til reglugerð er hjálagt, sí j.nr. 2006-0036. Umframt hetta skal støða verða tikin til, hvussu tiltakið skal fíggjast, og hvussu stór upphædd verður sett av pr. ár.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, og at ynski er um, at í § 2, stk. 4, kann undantaksloyvi verða givið í serligum førum.

Nevndin mælir eisini til, at kr. 250.000,00 verða settar av í fíggjarætlanini 2007.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt taka málið upp aftur í.s.v. fíggjarætlan-ina fyri 2007.

**Ískoyti:**
Skotið verður upp, at ein bólkur verður settur at viðgera umsóknir, sum koma inn. Uppskot til umboð í bólkinum: formaðurin í heilsu- og umhvørvisnevndini og 2 umboð frá heilsu- og umhvørvisdeildini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við omanfyri standandi uppskoti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. januar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**

Víst verður til reglugerð um stuðul til heilsu- og umhvørvistiltøk §3 stk. 1, har umsóknir um stuðul skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári.

Skotið verður upp at broyta freistina í reglugerðini til 1. apríl í hvørjum stuðulsári. Hetta er tí at ynski er um, at kunngjørt verður í umhvørvisvikuni hvørjar verkætlanir stuðul verður veittur til.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Reglugerðin hevur nú verið roynd í 2 ár og vísir royndin, at tørvur er á eini endurskoðan av reglugerðini. Broytingar/tillagingar eru gjørdar til reglugerðina, sí hjálagda notat j.nr. 2006-0036/12.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at tikið verður undir við broytta uppskotinum, og at beina málið í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, tó ynskir nevndin at umsitingin endurskoðar § 2, stk. 4, at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. desember 2008**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Umsitingin hevur endurskoðað §2 stk. 4 í reglugerðini, sí notat j.nr. 2006-0036/15.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum og at beina málið í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 6. januar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. januar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Umsitingin hevur endurskoaðað reglugerðina. Greitt verður frá málinum.

**Tilmæli:** (lagt fram á fundinum)

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at tikið verður undir við endurskoðaðu reglugerðini, j. nr. 2006-0036/22.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tey seinastu árini hevur Tórshavnar kommuna móttikið umsóknir, sum snúgva seg um gransking innan sjúkrahúsverkið. Hetta økið liggur hjá landinum undir heilsuverkinum, og tí er stuðul ikki latin hesum verkætlanum. Eisini eru umsóknir móttiknar, sum snúgva seg um ítróttt.
Skotið verður upp, at orðið "heilsa" verður tikið úr reglugerðini. Hetta fyri at fyribyrgja at misskiljingar stinga seg upp.
Mett verður, at náttúrligt er at stuðla verkætlanum innan umhvørvi, eftir sum hetta er arbeiðsøkið hjá heilsu- og umhvørvisdeildini.
Harafturat verður skotið upp, at Tórshavanar kommuna í reglugerðini tryggjar sær nýtslurætt til alt tilfar. Eisini eigur kommuna at tryggja sær, at tað klárt framgongur av tilfarinum, at Tórshavnar kommuna hevur latið stuðul til verkætlanina og um verkætlanin verður broytt framyvir, at hetta verður avtalað við Tórshavnar kommunu og at tað tá eisini framgongur at Tórshavnar kommuna hevur latið stuðul.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum (j. nr. 2006-0036/26) og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**269/11** **2011-2178 HH**

**Umsókn um at servitutturin á 991a og 991q verður avlýstur.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Ása og Jóan Eyðfinnur Olsen søkja um at servitutturin á matr. 991q og 991a Sandáarbreyt verður avlýstur. Tórshavnar kommuna hevur átalurætt.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Servitutturin, sum er tinglýstur 28. august 2000, er ein treyt fyri byggiloyvið sum varð givið til eitt úthús við altan, sum er samanbygt í verandi hús víst verður til at um umsøkjarin ynskir at byggja bilhús, kann kommunan geva serligt loyvi til tað uttan at servitutturin verður avlýstur.

Eigarin av matr. 991a, Ása og Jóan Eyðfinnur Olsen, søkja nú um at fáa servituttin avlýstan, grundað á, at tey ætla at byggja eitt bilhús.

Vísandi til servituttin, sum Tórshavnar kommuna hevur átalurætt til, kann kommunan geva serligt loyvi til byggiloyvi til ætlaðu umsókn um at byggja bilhús á matr. 991a.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Tórshavnar kommuna hevur átalurætt til servituttin á matrikilinum 991q og 991a.

**Umhvørvisárin:**
Onki

**Fíggjarligt:**
Avlýsingina til Tinglýsingina.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Ongar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Ongar

**Skjøl:**
Umsókn frá Jóan Eyðfinnur og Ásu Olsen j. 2011-2178
Kort úr Bentley
Tinglýstur servituttur j.2011-2178

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla frá, at servitutturin verður avlýstur vísandi til at Tórshavnar kommuna hevur heimild at geva serligt loyvi til bygging á matriklunum matr. 991q og 991a, sum er tinglýst á servituttinum í servituttinum.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fìggjarnevndin 14. desember 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**270/11** **2011-2787**

**Játtanarreglur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2012**

Reglurnar áseta, hvørjar heimildir eru galdandi, í sambandi við umsiting av játtanum sambært ársfíggjarætlanina.

Býráðið hevur sambært §41 í kommunustýrislógini játtanar-myndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Ein játtan er ein heimild til at hava útreiðslur, ella inntøkur, til eitt ávíst endamál í samsvari við tær fyritreytir, sum játtanin er givin eftir.

Tað áliggur ábyrgdarpersónum, sum hava fingið ræðisrætt og ávísingarheimild til eina játtan, umframt at fylgja galdandi reglum, at nýta játtanina skynsamt. Tað vil siga at útreiðslur og inntøkur verða nýttar til tað virksemi, sum játtanin er til.

Um játtanin ikki kann haldast, áliggur tað ábyrgdarpersóni, beinanvegin at boða avvarðandi fyrisiting frá.

Fíggjarætlanin verður samtykt á greinar og eykajáttan krevst til flyting millum greinar-nar.

Sambært kommunustýrisskipanini skulu ávísar umbønir góðkennast í fleiri nevndum
Talan er t.d. um húsaumsitingina, sum hoyrir undir byggi- og býarskipanarnevndina meðan virksemi í bygninginum hoyrir til aðra nevnd.
Slíkar umbønir skulu eisini góðkennast í fíggjarnevndini.

## Bruttojáttanir og nettojáttanir.

**Bruttojáttan**
Játtanin er býtt í tveir bruttokarmar. Talan er um ein karm fyri útreiðslur og ein fyri inntøkur. Møgulig øking/minking í inntøkunum ávirkar tí ikki játtanina til útreiðslur. Hetta er t.d. galdandi fyri barnaansingarstovnarnar.

**Nettojáttan**
Játtanin er ein nettokarmur. Talan er sostatt ikki um ein karm fyri útreiðslur og ein fyri inntøkur.
Møgulig øking/minking í inntøkunum ávirkar tí tøku játtanina.

## Eykajáttan

Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið veita eykajáttan. Umbønir um eykajáttanir verða viðgjørdar í avvarðandi nevnd, fíggjarnevndini og tvær ferðir í býráðnum. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Eyka játtanir skulu vera samtyktar innan 31. desember í fíggjarárinum.

- Hækking av samtyktu fíggjarætlanini við hækking av bæði inntøkum (§20 og §25) og útreiðslum (§1 - §7).
- Flyting millum einstøku greinarnar. Hetta er galdandi fyri bæði rakstur og íløgur.
- Flyting millum rakstur og íløgur.

## Flyting av játtan, rakstur

Flyting millum undirkontur, á somu høvuðskonto, krevja samtykt í avvarandi nevnd.

Flyting millum høvuðskontur, á somu grein, krevja samtykt í avvarandi nevnd og í fíggjarnevndini.

## Flyting av játtan, íløgur

Flyting millum játtanir til ávísar verkætlanir, undir somu grein, krevur viðgerð í avvarandi nevnd, fíggjarnevndini og einaferð í býráðnum.

## Serstakar ásetingar fyri einstøku játtanarsløgini

### Rakstrarjáttan :

Lýsing av rakstri

Rakstrarjáttan er útreiðslur til starvsfólk, keyp av vørum og tænastum og til rakstur av bygningum v.m.

**Játtan í fíggjarætlanini**

Í fíggjarætlanini eru rakstrarjáttanirnar settar á høvuðskontur og undirkontur.

Fyri høvuðskontu, 26.11.110 Barnaansing er galdandi, at játtanin verður reglerað mánaðarliga í sambandi við faktureringina, um barnatalið er hægri/lægri enn upprunaliga játtað.

**Framflytingar av meir- og minninýtslu**

Høvuðsreglan er, at framflytingar kunnu gerast sambært niðanfyri standandi ásetingum:

**Meirnýtsla**, sum í mesta lagi kann vera 5% av bruttojáttanini, , verður flutt til næsta ár. Meirnýtslan skal vera burtur, innan trý ár.

**Minninýtsla**, sum í mesta lagi kann vera 10% av bruttojáttanini, , verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er um at flyta meiri enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast fíggjardeildini

Framflytingarnar verða viðgjørdar sum eyka játtanir. T.v.s. við tveimum viðgerðum í býráðnum

**Íløgujáttanir:**

Lýsing av íløgum

Ein íløga kann eyðmerkjast sum:

- ein anleggsíløga (vegir, bygningar o.a.)
- ein einstøk og væl lýst uppgáva
- tíðaravmarkað verkætlan
- verkætlan við avmarkaðum tilfeingi
- Samlaði kostnaðurin er yvir kr. 1.000.000.

**Játtan í fíggjarætlanini**

Í fíggjarætlanini eru íløgujáttanirnar settar á høvuðskontu og undirkontur. Ein undirkonta kann hava fleiri verkætlanir.

**Játtan til hvørja einstaka verkætlan**

Hvør einstøk verkætlan skal samtykkjast eina ferð í býráðnum eftir tilmæli frá faknevnd og fíggjarnevndini.

Játtanir kunnu vera yvir fleiri ár.

Ikki nýtt játtan til verkætlanir sum eru í gerð, verður flutt til næsta ár við eykajáttan.

**Játtan til verkætlanir av bæði rakstri og íløgum.**

Verður ein verkætlan fíggjað bæði av rakstri og íløgum, skal rakstrarjáttanin flytast til íløguna. Hetta verður gjørt sum ein eykajáttan.

**Minni og meirnýtsla**

Minninýtsla á verkætlanum, sum eru í gerð, verður framflutt til næsta ár við eykajáttan.

Væntandi meirnýtsla í sambandi við einstakar verkætlanir skal leggjast fyri býráðið við umbøn um hægri játtan. Er verkætlanin yvir fleiri ár og játtan er tøk árið eftir, og samlaða játtanin heldur, verður meirnýtslan framflutt og viðgjørd sum eykajáttan.

**Eftirmeting av verkætlanum**

Tekniska fyrisitingin ger regluliga (kvartárliga) uppfylging av øllum verkætlanum, sum verða lagdar fyri avvarðandi nevnd, fíggjarnevndina og býráðið til kunnningar.

Tá ein verkætlan er liðug verður eftirmeting gjørd og løgd fyri avvarðandi nevnd, fíggjarnevndina og býráðið til kunnningar.

**Avlop av lidnum verkætlanum**

Avlop av lokaðum verkætlanum fellur aftur til íløgukarmin. Verkætlanin skal vera lokað og eftirmett í avvarandi nevnd, fíggjarnevndini og býráðið skal kunnast.

**Àrlig uppgerð**
Við ársenda útvegar fíggjardeildin eitt yvirlit yvir verkætlanir, sum eru í gongd og lokaðar verkætlanir. Yvirlitið verður lagt fyri nevndirnar og fíggjarnevndina.

Víst verður annars til serligar "politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir í sambandi við verkætlanir".

## Serligar reglur

**8375 Rakstrargøgn**
Stjórnin leggur uppskot um útskifting og nýkeyp komandi fíggjarár, fyri fíggjarnevndina til góðkenningar, , Tað er ikki neyðugt við góðkenning í býráðnum.

**Fyri fylgjandi stovnar er galdandi, at loyvt er ikki at flyta meir- ella minninýtslu millum fíggjarárini:**
2101 Naina
2615 Pedagogisk frípláss
2710 Ellis- og umlættingarheimið
2711 Tjarnargarður
2712 Heimið í Vallalíð

2810 Fíggjarlig frípláss
3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing
3213 Systkinaavsláttur
4123 Adventistaskúlin
4124 Frískúlin í Havn
4143 NSR
4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til at góðkenna játtanarreglur fyri 2012.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**271/11** **2011-2675 TÍH**

**Umbøn um játtan av løgukonti Fríðkan av býnum.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Umbøn um játtan av løgukonti
L00001 kr. Løgukarmur fyri árið 1.000.000
L00002 kr. Framfluttur Løgukarmur 331.000
Tilsamans **1.331.000**

At brúka til hall á konto L62006 (j.nr. 2005-2735) kr. 145.878
At brúka til hall á konto L620009 (j.nr. 2009-2012) kr. 116.219

At brúka til fíggjan av málum:
Hegn og rørportur á Velbastað kr. 531.000
Gøtur við Strond kr. 537.903
**Tilsamans kr. 1.331.000**

Mál nr. 2005-2735 L62006 og mál nr. 2009-2012 L62009 skula lokast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við hesi umbøn, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Ein meiriluti Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen og Jan Christiansen samtyktu til at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

Ein annar minniluti Bogi Andreasen tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Av tí at rættingar eru gjørdar í bókingunum fyri verkætlan L62009, eftir at málið varð fyrireikað og sett á skrá til byggi- og býarskipanarnevndina til fundin 28. nov. 2011, er hallið nakað minni enn tær kr. 116.219, sum standa í yvirlitinum omanfyri, sum var lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina. Orsøkin er, at ein rokning sum hoyrdi til aðra verkætlan varð bóka skeivt inn á prosjekt nr. L62009. Hallið minkar sostatt úr kr. -116.219 til kr. -62.000.

Omanfyristandandi umbøn um játtan av løgukonti Fríðkan av býnum verður tí broytt soleiðis:

**Umbøn um játtan av løgukonti Fríðkan av býnum.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Umbøn um játtan av løgukonti
L00001 kr. Løgukarmur fyri árið 1.000.000
L00002 kr. Framfluttur Løgukarmur 331.000
Tilsamans **1.331.000**

At brúka til hall á konto L62006 (j.nr. 2005-2735) kr. 145.878
At brúka til hall á konto L620009 (j.nr. 2009-2012) kr. 62.000

| | | |
|---|---|---|
| At brúka til fíggjan av málum: | | |
| Hegn og rørportur á Velbastað | kr. | 585.219 |
| Gøtur við Strond | kr. | 537.903 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **1.331.000** |

Mál nr. 2005-2735 L62006 og má nr. 2009-2012 L62009 skula lokast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini hin 28. november 2011, við omanfyristandandi broyting, og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

272/11 **2001-0243 TÍH**

**Moldplássið í Kollfjarðardali, avrigging, freist 10. februar 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kollafjarðar kommuna avtalaði við festaran Rólv Djurhuus 17. februar 1989 við góðkenning frá Landsverkfrøðinginum at gera molddunga í Kollfjarðardali.

Molddungin skal slættast eftir ávísing bóndans. Hetta er bert partvíst gjørt, og avtalað er við tekniska stjóran og býarverkfrøðingin at gera fyrst stig av slættingini liðugt til 01. juni 2001.

Festarin er sinnaður at hildið verður fram at koyra mold og avgrevsrartilfar á hetta plássið, sí hjáløgdu tekning.

Verandi molddungi er komin eftir 10 árum.

Tað er skylda kommununnar at úvega pláss at koyra mold og avgrevstur á, samb. § 2. í Løgtingslóg nr. 77, frá 1. juli 1984.

Mett verður at tørvur framhaldandi verður á at hava molddunga í Kollafirði, og at sáttmáli verður gjørdur við festaran.
Tað verður ikki hildið skilagott at flyta mold allan vegin úr Kollafirði til mold- og tyrvingarplássið í Húsahaga.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. mars 2000:** Tikið verður undir við framhaldandi at hava molddunga í Kollafirði, sambært tekning frá frílendisdeildini, dagfest februar 2001.

**12. mars 2001: Byggi- og býarskipanarnevndin:** Samtykti uppskotið.

Avgjørt at slætta nakað av dunganum í ár, skal verða liðugt fyrst í juni mánað, men verður seinkað av verkfallinum.
Eingin peningur er settur av til arbeiðið, men tað verður goldið av rakstri, helvt um helvt tekniska deild og frílendisdeildin.
Arbeiðið er í gongd.

**Kollfjarðarnevndin 31. mai 2001:** Kunnað varð um gongdina í málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at kommunan í skrivi frá 10. febr. 2009 frá Yvirfriðingarnevndini hevur fingið álagt at rigga moldplássið í Kollfjarðardali av, verður málið hervið lagt fyri viðkomandi faknevndir til støðutakan.

24. september 2002 loyvi frá LV at flyta íbindingina í landsvegin

10. juli 2008 skriv frá náttúrufriðingarnevndini viðv, loyvi at halda fram at tyrva á staðnum.

8. februar 2009 skriv til Yvirfriðingarnevndina um støðuna við mold- og avgrevstartyrvingarplássum í Kollafirði og kommununi sum heild.

10. februar 2009 skriv frá Yvirfriðingarnevndini um at lata plássið aftur í avriggaðum standi 2 ár frá móttøkuni av skrivinum, t.v.s. 10. februar 2011.

Dungin er í ár 20 ára gamal. Hann er lítið prýðiligur har hann liggur, men verður farið fram eftir tyrvingarplaninum frá 2001, verður væl frágingið.

Yvirfriðingarnevndin, Búnaðarstovan og festarin skulu hava fráboðan um støðutakan.

**Kostnaðarmeting:**

| | |
|---|---|
| Liðugtgerð og avrigging av moldplássinum. | 200.000 kr |
| Moldplanering uml. 13.000 m$^3$ av mold skal flytast | 150.000 kr. |
| Samlaðar útreiðslur. íroknað mvg | 350.000 kr |

Sambært statusuppgerð primo september 2009 eru írestandi kr. 745.000,- á kt. 90-1011-11883.

Arbeiðið at gera gøtuna í Dalinum Langa er liðugt, og sostatt eru kr. 745.000,- í avlopi.

Sambært fíggjarnevndarsamtykt 9. september 2009 í máli nr. 2007-0649 (kloakk í Skraddaragøtu) eru fluttar kr. 260.000,- av kt. . 90-1011-11883. Sostatt eru tøkar kr. 485.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarvekfrøðingurin mæla til at játta 350.000 kr. av konto 90-1011-11883 til avrigging av molddunganum í Kollafjarðardali og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 15. september 2009:** Leiðarin fyri lendisdeildina, Tóri í Hoyvík, greiddi frá um málið.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Lendisdeildin, plandeildin og heilsu- og umhvørvisdeildin hava kannað hóskandi støð nærindis Kollafirði at leggja moldpláss. Semja var um, at best hóskandi staðið er í Kollfjarðadali á somu leið har gamla moldplássið er. Skotið verður upp at leggja nýtt moldpláss vestan fyri Dalánna, millum ánna og uppdyrkingarvegin, ið Royndarstøðin hevur latið gera.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla heilsu- og umhvørvisnevndini til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina at taka undir við uppskotinum til staðseting av moldplássi í Kollfjarðadali.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. november 2010:** Málið varð útsett, tí nevndin ikki var viðtøkufør.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Byggi- og býarskipanar-, lendis- og heilsu- og umhvørvisdeildin hava kannað hóskandi støð nærindis Kollafirði at leggja moldpláss. Semja var um, at best hóskandi staðið er í Kollfjarðadali á somu leið har gamla moldplássið er, bert vestanfyri ánna.
Skotið verður upp at leggja nýtt moldpláss vestan fyri Dalánna, millum ánna og uppdyrkingarvegin, ið Royndarstøðin hevur latið gera.

Lendisdeildin heldur hugskotið verða av landslagsligum týdningi, so verandi viðurskifti á staðnum, hálvveltur hagi/bøur kann fríðkast til veltan bø, líkasum økini eystanfyri Dalánna.

Víðari gongd í málinum verður hjá umhvørvisdeildini, umvegis teknisku deild, at gera byggiprogram, projekt og løgdeildina at greina loyvi frá friðingarmyndugleikunum, og síðani gera sáttmála við avvarðandi brúkara og eigara av økinum, tá fíggjarnevndin og býráðið hava góðkent uppskotið, og játta fígging til ætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla býarskipanarnevndini at taka undir við uppskotinum til staðseting av moldplássi í Kollfjarðadali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina til at taka upp samráðingar við eigaran um lendi.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og taka upp samráðingar við eigaran um lendi.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við at loka og avrigga tyrvingarplássið, projekt nr. L62006, er komið at enda. Kostnaðurin av arbeiðinum er 145.878 kr hægri enn mett. Løgan varð játtað av býráðnum 5. november 2009.
Av tí at eingin avklári ng er komin upp á staðseting av nýggjum mold- og tyrvingar- plássi í Kollafirði, samráðingar eru í gongd við Búnaðarstovuna, so verður enn koyrt nakað av tilfari til økið. Av omanfyristandandi frágreiðing og vatnveitingar- og íbinding í landsveg trupulleikum, er meirnýtsla uppá 145.878 kr, sí eisini j.nr. 2011-2675. Biðið verður um at fíggja hallið av løgukont L00001, og at arbeiðstøka L62006 við hesum verður lokað.
Sagt verður frá, at Heilsu- og umhvørvisdeild kommununnar hevur tikið yvir leiðsluna av hesum plássi frá Lendisdeildini, og hevur nú málið um nýtt pláss í Kollafirði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við uppskotinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**273/11** **<u>2009-2012 TÍH</u>**

**<u>Reinsaríið: Lendistrappa v.m.</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Lendistrappa v.m. Reinsaríið.
Arbeiðið løgunr. L62009, at skipa økið og gonguleiðir, umframt at hampa og fríðka uttanum Reinsaríið, er liðugt. Hall upp á 116.219 kr, sí eisini j.nr. 2011-2675 er íkomið av leiðingsarbeiðum, sum so ofta í gamla býarpartinum, er torført frammanundan at spáa um. Biðið verður við hesum um at fíggja hetta hall av løgukonto L00001.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við omanfyristandandi frágreiðing og umbøn.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Av tí at rættingar eru gjørdar í bókingunum fyri verkætlan L62009, eftir at málið varð fyrireikað og sett á skrá til byggi- og býarskipanarnevndina til fundin 28. nov. 2011, er hallið nakað minni enn tær kr. 116.219, sum nevnt omanfyri. Orsøkin er, at ein rokning sum hoyrdi til aðra verkætlan varð bóka skeivt inn á prosjekt nr. L62009. Hallið minkar sostatt úr kr. -116.219 til kr. -62.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini hin 28. november 2011, við omanfyristandandi broyting, sum er neyvari útgreinað í j. nr. 2011-2675 og at beina málið í býráðið til góðkenningar og at lokað.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**274/11** **<u>2010-1429 TÍH</u>**

**<u>Tún við Perluna og Reinsaríið</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Í desember 2009 var fíggjarætlan fyri 2010 samtykt av býráðnum, undir íløgum L62009 vóru 700.000 settar av.
Tann 8. juni 2011 fekk kommunan eina meting , ið kostaði 726.000 kr u/mvg
Tann 11. juni 2010 fundur á kommunuskrivstovuni har kommunustjórin boðar frá, at játtaðar eru 700.000 kr v/mvg, uttan mvg er tað 658.800 kr, sí eisini j.nr. 2011-2675. Álagt var at halda játtanina.
Tann 23. juni2010 var gjørd skrá og kostnaðarmeting av arbeiðinum, ið fevndi um og tikið av tilboð frá byggifelag.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Tilrigging av arbeiðsplássi kr. | 45.000 |
| 2. | Avgrevstur og burturkoyring kr. | 95.000 |
| 3. | Grevstur og veiting avdrentilfari við Íshúsið kr. | 48.000 |
| 4. | Trappa ORANJE kr. | 85.000 |
| 5. | Renna framman fyri Perluna kr. | 25.800 |
| 6. | Stoyping av 20 cm betonmúrum kr. | 105.000 |
| 7. | Umlegging av kloakk og dragirørum kr. | 133.000 |
| 8. | Asfaltering kr. | 65.000 |
| 9. | Pullartar kr. | 41.000 |
| 10. | Ljósmastrarfundament 2 stk kr. | <u>16.000</u> |

Samanlagt u/mvg **<u>658.800</u>**
Arbeiðið var liðugt til ólavsøku 2010.
Við uppgerðina av arbeiðinum er íkomið hall upp á 116.219 kr. av óvæntaðum leiðingsarbeiðum, hetta hendir tíðum í gamla býarpartinum. Biðið verður um at fíggja hallið av løgukonto L00001, løgukarmur fyri árið, og at málið verður lokað.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við uppskotinum, og at senda tað til býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Av tí at rættingar eru gjørdar í bókingunum fyri verkætlan L62009, eftir at málið varð fyrireikað og sett á skrá til byggi- og býarskipanarnevndina til fundin 28. nov. 2011, er hallið nakað minni enn tær kr. 116.219, sum nevnt omanfyri. Orsøkin er, at ein rokning sum hoyrdi til aðra verkætlan varð bóka skeivt inn á prosjekt nr. L62009. Hallið minkar sostatt úr kr. -116.219 til kr. -62.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini hin 28. november 2011, við omanfyristandandi broyting, sum er neyvari útgreinað í j. nr. 2011-2675 og at beina málið í býráðið til góðkenningar og at lokað.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**275/11** **<u>2011-2748</u>**

**<u>Mentanarhøli í miðbýnum</u>.**

**Málslýsing:**
Nettojáttanin til Mentanarhøli í Miðbýnum, t.e. rakstur av Perluni, er kr. 0,- í ár, og higartil hava ongar inntøkur verið. Útreiðslur hava verið til hølini, m.a. til at bøta um ljóðviðurskiftini, og sostatt er hall á rakstrarkontu 5312 Mentanarhøli í miðbýnum. Greitt er, at ikki ber til at reka húsið uttan fígging, og til næsta ár eru settar kr. 200 tús. av til rakstur. Vísandi til hetta verður mælt til at flyta kr. 293.000 av kontu 6275 Torg við Perluna og Reinsaríið L62013 til rakstrarkontu 5312.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta kr. 293.000,00 av konto 6275 Torg við Perluna og Reinsaríið L62013 til rakstrarkontu 5312 Mentanarhøli í miðbýnum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**276/11** **2009-2173**

**Umbøn um játtan til at dagføra lon 2 í Venjingarskúlanum**.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Í lon 2 í Venjingarskúlanum eru serhøli, sum nú verða umbygd og dagførd. Umbyggingin fór í gongd í fjør og verður sambært tíðarætlanini liðug í viku 37. Tá umbyggingin er liðug, eru hølini til alis- og evnafrøði dagførd og haraftrat verður eitt nýtt høli til fyrilestrar.

Umbyggingin fór í gongd uttan góðkenning frá kommununi, so sum sáttmálin millum Føroya Landsstýrið og Tórshavnar Býráð um býtið av felagsútreiðslunum fyri Lærarskúlan og Venjingarskúlan annars ásetir, og ávís ósemja hevur verið millum kommunuan og Landsverk, sum vegna Mentamálaráðið stendur fyri arbeiðinum. Arbeiðið steðgaði á heysti í fjør vegna manglandi játtan úr landskassanum, men vísandi til átrokandi tørvin á hølunum til undirvísing hevur kommunan samskift við Mentamálaráðið og Landsverk. Semja er nú gjørd um hetta arbeiðið.

Føroya Læraraskúli og Venjingarskúlin eru ein samogn. Sambært sáttmálanum eru felagsútreiðslurnar býttar millum Læraraskúlan og Venjingarskúlan í lutfallinum 60/40. Sostatt er kommunurnar partur av útreiðslunum til umbyggingina og dagføringina av nevndu serhølum 40% av kostnaðinum.

Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er 2.585.000 kr. Parturin hjá Tórshavnar kommunu er 1.034.000 kr. Harumframt koma kr. 64.625 í mvg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játtaðar verða 1.034.000 kr. umframt mvg kr. 64.625 av árligu játtanini til dagføring av skúlum konta 4175 til umbyggingina av serhølunum í Venjingarskúlanum.

**Mentamálanevndin 9. mars 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá mentamálanevndini og jatta kr. 1.100.000 av konto 4175.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Í sambandi við umbygging og dagføring av hølunum til alis- og evnafrøði í Venjingarskúlanum, vóru partarnir samdir um at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku, og inn eru komin tvey undirhondsboð.

Víst verður til mál 2011-1221.

Tilboðini eru hesi:
Allar upphæddir í kr., uttan mvg.

| | |
|---|---|
| Sp/f Húsavarðartænastan | kr. 1.977.689,00 |
| Sp/f DíGJ | kr. 2.040.103,70 |

Ráðgevin hevur gjøgnumgingið tilboðini og mælir til, at tikið verður av lægra tilboðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ráðgevanum og taka av lægra tilboðnum, sum er frá Sp/f Húsavarðartænastuni.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og gera sáttmála við Sp/f Húsavarðartænastan.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**277/11** **2011-2593**

**Bátahylur á Sundi**

Lýsing av málinum – samandráttur:
Bíðilistin eftir bátaplássi í Tórshavn, hevur verið langur í nógv ár. Tað eru í løtuni 300 bátar á bíðilista, har tær elstu umsóknirnar eru frá 2001.

Tað er ilt at meta um, um allir umsøkjararnir høvdu tikið av einum tilboði um bátapláss, um tað stóð teimum í boði, tí kanska fleiri av teimum, sum standa á listanum, hava funnið aðrar loysn. Hinvegin kann eisini hugsast, at fólk halda seg aftur at søkja, tí bíðilistin er so langur.

Tað er avmarkað við egnaðum plássi til bátahyl nær Havnini. Eystan fyri verðandi bryggju á Sundi er tó eitt stað, har til ber at gera ein bátahyl. Økið á landi er rímuliga stórt, og hóast Kaldbaksfjørður er djúpur, er dýpið, har brimgarðurin skal gerast, ikki meira enn umleið 10 m.

Ein møguligur Eysturoyartunnilin er settur at koma upp oman fyri tann ætlaða bátahylin, hetta kann gera, at tað verður eitt avmarkað pláss uppi á landi.

Her er møguligt at gera ein bátahyl til umleið 260 bátar, og eitt øki uppi á landi upp á umleið 10 t. m², fyri umleið 30. mió.

Áðrenn endalig støða kann takast til bygging, er neyðugt:

- at fáa góðkenning frá LV/Innlendismálaráðnum um staðseting.
- at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum
- at kanna ávirkanina á umhvørvið
- at gera teldusimuleringar av kyrruni í bátahylinum, og verðandi bryggju á Sundi.

Tað kostar pening at gera kanningar av hvørja ávirkan ein møgulig útbygging hevur á umhvørvið, og at gera teldusimuleringar av kyrruni.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til

- at fáa góðkenning frá LV/Innlendismálaráðnum um staðseting
- at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum
- at kanna ávirkanina á umhvørvið
- at gera teldusimuleringar av kyrruni í bátahylinum, og verðandi bryggju á Sundi
- at gera byggiprogram- at játta 1 mió. til nevndu fyrireikingar.

**Havnarnevndin 14. november 2010:** Málið varð umrøtt og útsett.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Tikið av skrá.

**Havnarnevndin 5. desember 2011:** Ein meiriluti, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Halla Samuelsen taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Vagnur Johannesen mæla til at halda fast við uppruna ætlanina, at gera Álakersvík til smábátahavn til 150 bátar.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Ein meiriluti, Heðín Mortensen, Halla Samuelsen og Jógvan Arge mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í havnarnevndini og játta kr. 1 mió av framfluttari játtan á konto 7476, smábáta-havnir.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, taka undir við tilmælinum hjá minnilutanum í havnarnevndini og mæla til, at Bátafelagið verður hoyrt í málinum.

**Býráðið 14. desember 2011:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Jan Christiansen, um at beina málið aftur í havnanevndina, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**278/11** **2011-2586**

**Umsókn frá P/F Magn, um at leingja leigusáttmálan av grundøkinum undir skrivstovu- og goymslubygninginum á Viðarnesi.**

Lýsing av málinum – samandráttur:
P/F Magn søkir í skrivi dagfest 3. november 2011 um, at leigumálið av grundøkinum undir skrivstovu- og goymslubygninginum á Viðarnesi verður longdur fram til 2025.

P/F Magn og Tórshavnar havn hava tvær leiguavtalur um grundøkir á Viðarnesi.
Onnur avtalan er viðvíkjandi grundøkinum undir teimum báðum nýggju oljutangunum, sum í fyrsta lagi kunnu uppsigast í 2030. Her er ikki ynski um broytingar.

Hin avtalan, og tað er her at P/F Magn ynskir at broyta, er um grundøkið undir skrivstovubygninginum, goymslubygninginum, áfyllingini til oljubilarnar og nakað av uttanduragoymslu uppá tilsamans 2.800 m2.

Í leigumálinum stendur m.a. at:

1. leigumálið kann sigast upp í 2015
2. um eigarin (Th) uppsigur leigumálið áðrenn 2015, skal hann lata leigaranum(Magn) annað eins høgligt øki, ið hevur somu vídd og kann nýtast til sama endamál, og at eigarin (Th) skal endurgjalda leigaranum allar útreiðslur, ið standast av slíkari flyting.

Avtalan um at leigumálið kundi uppsigast longu í 2015 var gjørd, fyri at tað skuldi vera møguligt at fáa tann partin av virkseminum hjá P/F Magn av økinum, sum ikki absolutt mátti liggja á havnaøkinum. Hetta kundi verið aktuelt, um annað havnavirksemi tørvaði plássið, sum P/F Magn hevur leiguavtalu um.

Tað eru í minsta lagi 3 møguleikar:

a. At halda fast við verðandi leigusáttmála.
b. At ganga umsóknini frá Magn á møti og leingja leigumálið til 2025.
c. At finna aðrar loysn, báðir partar kunnu liva við

Samráðingar hava verið millum Th og P/F Magn um aðrar loysn enn a) og b), og kann P/F Magn ganga við til at:

1. leigumálið kann sigast upp til 2022
2. um eigarin (Th) uppsigur leigumálið áðrenn 2022, skal hann ikki finna annað hóskandi øki til leigaran (Magn), men ístaðin yvirtaka bygningarnar á økinum fyri metingarvirðið.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Av tí at tað ikki í løtuni eru nakrar ætlanir um nakað annað virksemi á Viðarnesi, sum má liggja á tí umtalaða økinum, og at tað er trupult at finna annað eins høgligt øki, verður mælt til at broyta sáttmlan soleiðis at:

1. leigumálið kann sigast upp til 2022

um eigarin (Th) uppsigur leigumálið áðrenn 2022, skal hann ikki finna annað hóskandi øki til leigaran (Magn), men ístaðin yvirtaka bygningarnar á økinum fyri metingarvirðið.

**Havnarnevndin 5. desember 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Levi mørk var ikki við til viðgerðina av hesum málinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 14. desember 2011:** Jan Christiansen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli. Einmælt samtykt.

279/11 **2008-3153 EYE**

**Tryggjan av beni fram við Skansan, Havnargøtu, P-plássinum á Skálatrøð og við grótbrotið við Oyggjarvegin**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við at umsitingin, saman við Landsverki, hevur gjørt kanningar av trygdini fram við beninum á økinum á Havnargøtu, fram við Skansanum, p-plássiinum á Skálatrøð og í grótbrotinum við Oyggjarvegin, er staðfest, at munandi trygdartiltøk mugu setast í verk beinanvegin. Hetta av teirri orsøk, at leyst tilfar stendur til at detta oman á ferðandi á nevndu økjum. Farið er undir arbeiðið at skróta undir forberginum á Skálatrøð og fastseta boltar í bergið á p-plássinum við Havnargøtu. Uppskot um betran av berginum undir Skansanum verður eisini gjørt í samráð við friðingarnevndina.

Tað fyriliggur í løtuni ikki nøkur ítøkilig verkætlan av nevndu arbeiðum, men mett var at tað var neyðugt at fara undir arbeiðið alt fyri eitt.

Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Síðani á vári 2008 hevur, við hjálp frá Landsverk, verið arbeitt við at tryggja benini kring havnalagið, har tað var mett mest átroðkandi, tað er fram við parkeringsøkinum á Skálatrøð og fram við parkeringsøkinum, har Skipshandilin og Kioskin v.m. eru.

Tó er einki enn gjørt við at tryggja ytra skansagarðin á Havnar Skansa móti at rapa niður á Havnargøtu, hóast tað er mett at vera tað mest átroðkandi.

Tórshavnar kommuna hevur heitt á Føroya Fornminnissavn um beinavegin at taka stig til at tryggja at partar av skansanum ikki rapa oman yvir fólk og akfør á vegnum undir skansanum.

Fornminnissavnið hevur í skrivi, dagf. 21 mai 2008, víst málinum frá sær við teirri grundgeving, at nevndi vandi ikki er íkomin vegna vantandi viðlíkahald av friðaða fornminninum, men er orsakað av at undirlendið er skotið burtur í sambandi við útbygging av eystara havnarlagi.

Føroya Fornminnissavn heitir ístaðin á Tórshavnar kommunu um at átaka sær kostnaðin av at tryggja bergið og teir partarnar av friðaða fornminninum, sum eru komnir í vanda fyri at rapa, og í samráð við Fornminnissavnið at seta neyðugu arbeiðini í verk.

Royndir eru gjørdar at fáa eina verkætlan í lag, í samstarvi millum kommununa, Landsverk og Fornminnissavnið, sum høvdu til endamáls, skjótt at fáa í lag eina tryggjan av at partar av skansagarðinum ikki detta oman á Havnargøtu, uttan at støða var tikin til hvør hevði ábyrgdina fyri íkomnu støðuni.

Nevndu royndir, sum eru gjørdar at fáa eina verkætlan í lag, í samstarvi millum kommununa, Landsverk og Føroya Fornminnissavn hava víst seg ikki at bera á mál.

Í almennu byggisamtyktini kap. 1. §6, stk. 1. er ásett:

"Allar byggingar skulu, í øllum lutum og øllum sum hoyrir til, altíð verða hildnir í fullgóðum og vandaligum standi. Um umsiting av bygging er stak vánalig, kann byggivaldið geva boð um, at bøtast skal um brekini og um neyðugt lata tey gera fyri eigarans rokning."

Tórshavnar kommuna kann tískil, við heimild í almennu byggisamtyktini, geva eigaranum av Havnar Skansa boð um at bøta brekini við ávísari freist og um hetta er úrslitaleyst, kann kommunan lata tey gera fyri eigarans rokning.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at geva Føroya Fornminnissavni boð um at bøta Havnar Skansa, við 3 mánaða freist og at kommunan, um hetta er úrslitaleyst, fráboðar politinum um støðuna og fer undir at gera arbeiðið fyri eigarans rokning.

**Tekniska nevnd 4. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarverkfrøðingurin hevur á fundi við Fornminnissavnið umrøtt støðuna viðvíkjandi Havnar Skansa og sigur Fornminnissavnið seg hava felags áhuga við Tórshavnar kommunu, at tryggja fornminnið og vil Fornminnissavnið lutttaka í hesum arbeiðið í tann mun hetta er innanfyri matrikukulin hjá skansanum og annars við ráðgeving í tann mun, sum tørvur er á, í sambandi við trygging av beninum frammanfyri og undir Havnar Skansa.

Býarverkfrøðingurin hevur síðani heitt á serkønan ráðgeva, um í samstarvi við Fornminnissavnið, at fara undir at fyrireika útboðstilfar til arbeiðið at tryggja ytra skansagarð, benið undir Havnar Skansa og benið undir Skansavegi.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

Grundað á kostnaðin fyri tryggjan av beninum fram við kaffivogninum við Havnargøtu og Skálatrøð, ið var ca. 1,3 mió. kr., veður fyribils mett, at hetta arbeiðið fer at kosta millum 1,5 og 2,0 mió. kr.

**Tilmæli:**
Vísandi til at tað er neyðugt at fara undir arbeiðið at tryggja benið undir Skansanum og fram við Havnargøtu skjótast gjørligt, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at arbeiðið verður fíggjað av eykajáttan fyri íløgur.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at beina málið í havnarnevndina.

Vegurin undir Skansanum førir beinleiðis oman á Eystaru bryggju, og tí er tað natúrligt, at havnin rindar fyri tann partin, sum helst svarar til umleið helmingin av kostnaðinum, at tryggja benið fram við Skansanum og fram við Havnargøtu.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til, at tekniska umsitingin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri arbeiðinum, og at Tórshavnar havn rindar fyri helmingin av kostnaðin, at fíggja av rakstri í 2011.

**Havnarnevndin 9. mars 2011:** Tikið verður undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at heita á umsitingina um at eftirkanna kostnaðin og verkætlanina. At leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sett seg í samband við annan ráðgeva at meta um fyriliggjandi útbjóðingartilfar.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært upprunaligu metingini grundað á fyriliggjandi útbjóðingartilfar, var samlaði kostnaðurin at tryggja benið undir Skansanum og fram við Havnargøtu mettur at verða kr. 8.609.954,- (sí skjal nr. 2008-3153/23).

Sambært nýggju metingini verður ikki neyðugt at bora og festa so nógvar hellubo ltar sum upprunaliga mett. Kostnaðin fyri tí nýggju metingina, hevur umsitingin mett til kr. 1.000.000,- íroknað higartil goldnar útreiðslur av rakstri v.m. (sí skjal nr. 2008-3153/35). Víst verður annars til notat í málinum (skjal nr. 2008-3153/36).

Higartil er goldið umleið kr. 500.000,- av rakstri.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstardeildini mæla til, at tekniska umsitingin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri arbeiðinum, og at tekniska nevnd tekur upp samráðingar við havnanevndina, um at rinda kr. 500.000,- at fíggja av íløgum 2012 innan havnaøkið. Mælt verður eisini til at beina málið, um havnanevndina og fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og beina málið um havnanevndina og fíggjarnevndina, í býráðið.

Jákup Símun Simonsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Havnarnevndin 5. desember 2011:** Tikið verður undir við samtyktini í teknisku nevnd 1. desember 2011.

Levi Mørk luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og havnarnevndini.

**Býráðið 14. desember 2011:** Jan Christiansen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli. Einmælt samtykt.

**280/11** **2011-2170 (sí eisini mál nr 20074-3218 og 2011-1750) BH/EY**

**Jóhanna Garðshorn og Óli Hammer: Umsókn um at yvirtaka nýgjørdu vegirnar á matr. nr. 1224a, Tórshavn - íbinding Kongsgil**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Jóhanna Garðshorn og Óli Hammer hava í umsóknarblaði søkt kommununa um yvirtøku av vegunum á matr. nr 1224a, Tórshavn. Hetta í sambandi við at umsitingin hevur havt samskifti við umsøkjararnar í sambandi við góðkenning av útstykkingarætlanini, j. nr. 2007-3218. Staðfest er at arbeiðið er gjørt sambært ásettum krøvum í góðkenda projektinum og sostatt er einki til hindurs fyri yvirtøku av vegunum.
Umsitingin greiðir annars frá gongdini í málinum um býarplan fyri økið oman fyri Marknagilsvegin, j. nr 2011-1750.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at ganga umbønini á møti um yvirtøkuna av vegunum uttan nakrar treytir frá verandi eigara.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum, og beinir málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 14. desember 2011:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jákup Símun Simonsen og Jógvan Arge

**281/11** **2007-1290 MKJ/PAP/GHM**

**Útstykking – Djúpagil – Millum Gilja**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykking í økinum, har Djúpagil møtir nýggja sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin.

Útstykkingin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi við áum og gilum, sum seinni blíva størri við Djúpagil. Ætlanin er, at avkoyring til skal verða frá nýggja sambindingarvegnum til útstykkingina.

Útstykkingin vil halda fram við verandi útstykkingar fram við gilinum, niðan til nýggja sambindingarvegin og harvið eisini binda økini á báðum síðum av sambindingarvegnum meira saman.

Økið kann íalt hýsa 30 nýggj grundøki við møguliga einum øki til stovnsbygging eystanfyri. Hetta síðsta vil tó helst krevja eina íbinding afturat í sambindingarvegin.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 500.000,- kr. verða settar av til projektering og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Hon heitti samstundis á umsitingina at fyrireika útstykkingina soleiðis, at stykkini verða seld liðugt planeraðið. Kunnað var um at talan er um eina útstykking við 300 fermetra stykkjum við felags parkeringsplássum, gøtusambondum og skipaðum fríøkjum. Nettonýtslustigið verður 0,4.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at leggja kr. 500.000,- út til projektering og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útstykkingarætlan við uml. 35 grundstykkjum á 300 fermetrar og 2 felagsøkjum. Útstykkingin hevur atgongd frá sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin og er skipað í 4 bólkar fram við einum atkomuvegi. Atkomuvegurin hevur gongubreyt báðumegin.

Norðan fyri atkomuvegin er avsett pláss til 1 eyka parkeringspláss pr. matrikul. Innkoyringarnar til bústaðarbólkarnar eru markeraðar við vegbungum. Gøtusamband er til Stórutjørn gjøgnum ein tunnil undir sambindingarvegnum.

Grundstykkini liggja fram við 8 m breiðum vegum uttan kantsteinar. Vatnrennur úr beton er mark millum gongubreyt og koyribreyt. Koyribreytin er 4 m breið.

Ætlanin er at lata liðugt planerað grundstykkir við ásettum byggifelti og planeringshædd.

Gongugøtur eru millum bústaðareindirnar og felagsøkir. Gøturnar hava samband við verandi gøtuskipan.

Ætlanin er at bjóða útstykkingina út millum 5 ráðgevarar til projektering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna ætlanina og at projekteringin av útstykkingini verður boðið út millum 5 ráðgevaravirkir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við støðutakanina til víðari projektering av ústykkingarætlanini, skal støða takast til atkomuviðurskifti til rørslutarnað, gongu- og súkklubreyt og reinskan av vegvatni. Vìst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-1436: Mál

um súkklubreytir og atkomurviðurskiftini hjá rørslutarnaðum og mál nr. 2005-1437: Mál um yvirflatuvatntrupulleikar í kommununi.

Greitt verður frá útstykkingarætlanini.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, men ynskir at umsitingin kemur við einum betri uppskoti um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Plan-og rakstrardeildin hevur viðgjørt spurningin um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst. Víst verður til TK j. nr. 2011-2473/skjalamappur 1-4.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til útstykkingarætlan - uppskot nr. 4 (j. nr. 2011-2473/4), tó við teirri broyting, at íbindingin verður yvir av framtíðar íbinding til Stórutjørn og at vegamótið verður skipað soleiðis, at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Ferðslunevndin 1. november 2011:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum og beinir málið í teknisku nevnd til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðaran á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við ferðslunevndini og at beina endaligu loysnina og tær broytingar, tær viðføra av útstykkingarætlanini, til byggi- og býarskipanarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Jan Christiansen og Annfinn Brekkstein, ynskir at umsitingin kemur við alternativum uppskotum við kostnaðarmetingum, at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Levi Mørk, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegna krøv frá teknisku deild um broyting av atkomuviðurskiftunum í mun til upprunauppskotið (2007-1290/6), hevur umsitingin tillagað upprunauppskotið (sí skjal2007-1290/20,3). Afturat eru gjørd 2 alternativuppskot (sí skjøl 2007-1290/20,1 og 2).

Hjálagt eru yvirlit yvir veglongdir, tal av grundstykkjum og samlað grundøki.

**Tilmæli:**
Tekniska stjórin og býararkitektin mæla til:
1. At góðkenna uppskotið til útstykkingaætlan.
2. At góðkenna vegføring og íbinding treytað av góðkenning í tekniska nevnd.
3. At umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt við m.a. áseting av byggifeltum, byggilinjur o.a. at leggja fyrri nevnd.
4. At heimilda umsitingin at útvega skitsuupskot við kostnaðmeting fyri liðugt planeraði stykkir.
5. At jatta upp til 400.000kr.til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera alternativ uppskot við fyribils kostnaðarmetingum sambært samtykt í teknisku nevnd frá 8. november 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við alternativa uppskoti nr. 1, dagf. 14.11.11, j.nr. 2007-1290/20 (1 av 3). Samstundis verður mælt til at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta 400.000 kr. av konto 6175 til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**282/11** **<u>2008-3134 PAP</u>**

**Høvuðsprojekt-Nevndarviðgerð: Rundkoyringin Sundsvegur – Blómubrekka - Óluvugøta**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Víst verður til mál j.nr. 2005-2344: Dispositiónsuppskot: Rundkoyring Sundsvegur – Blómubrekka – Óluvugøta.

Dispositiónsuppskotið hevur verið til "Ferðslutrygdargrannskoðan" hjá Viatrafik, sí j. nr. 2008-3124/1.
Somuleiðis hevur Viatrafik gjørt eitt projektuppskot við koyrikurvum, sí j. nr. 2008-3125/1. Projektuppskotið er broytt nakað í mun til dispositiónsuppskotið.

Umsitingin hevur gjørt ráðgevingaravtalu við LBF P/f um projektering og eftirlit viðvíkjandi rundkoyringini. Víst verður til j. nr. 2008-3127/1.

Ráðgevingarfyritøkan LBF P/f hevur gjørt høvuðsprojekt, sí j. Nr. 2008-3132/1, grundað á projektuppskotið frá Viatrafik.

Rundkoyringin hevur ein diametur upp á 37 m við 3 m gongu- og súkklubreyt.

Atlit eru tikin til estetik, og at møguleiki verður at planta vøkstur í skráarnar. Eisini verður grótgarður laðaður, har tað er neyðugt.

**Fíggjarviðurskiftir:**
LBF P/f hevur gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðnum, sí j. nr. 2008-3133/1.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/2.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**
1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting
2. Útbjóðingarháttur

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við fyriliggjandi loysn - tó so, at hædd verður tikin fyri framskrivaðum ferðslutrýsti á økinum við støði í frágreiðing frá Rambøl Nyvig frá apíl 2008 um Innkomuvegin til Havnar (sí mál nr. 2001-0407) og annars at projektið tekur hædd fyri verkætlanini viðv. dagføringini av Sundsvegnum (sí mál nr. 2008-1294).

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umsitingin hevur heitt á ráðgeva um at gera uppskot til eina tveysporaða rundkoyring. Víst verður til TK j. nr. 2008-3132/2. Tilkoyringarvegurin Sundsvegur er ætlaður til at verða tveysporaður í framtíðini, meðan tilkoyringarvegirnir Blómubrekka og Óluvugøta verða einsporaðir vegir í framtíðini.

**Keyp av lendi:**

Lendisviðurskiftini verða broytt nakað í mun til fyrra uppskotið, og má hesin spurningurin takast upp við eigararnar av matr. nr. 1464a, 1466.

**Fíggjarviðurskifti:**
Umsitingin hevur heitt á ráðgevan LBF P/f um at gera eina kostnaðarmeting av dupultrundkoyringini, sí skjal nr. 2008-3133/3.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/4.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**

1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna høvuðsprojektið og kostnaðarmetingina og at málið um útvegan av meira lendi verður beint í fíggjarnevndina til at taka upp samráðingar við lendiseigararnar.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at umsitingin leggur uppskotið við ítøkiligari kostnaðarmeting fyri nevndina aftur, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið og við vegaíbinding til Sundsvegin, skal støða takast til um ikki vegamótið Sundsvegur/Óluvugøta/Blómubrekka skal dagførast við ætlaðu rundkoyringini. Málið um gerð av rundkoyring hongur eisini saman við alsamt væntandi øktari ferðslu í sambandi við atkomuvegin til Havnar. Harumframt kann væntast økt ferðslutrýst í sambandi við íbúðarbygging á økinum millum Blómubrekku og Villingardalsvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av 8,6 mió. kr. (smb skjal nr. 2008-3133/2) til at gera útbjóðingartilfar til rundkoyringina at leggja fyri nevndina aftur, og at fremja arbeiðið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Málið umrøtt.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin, ísv. við málið um dagføring av Sundsvegnum, j. nr. 2008-1294, kannar ymsar vegaloysnir á vegamótinum Sundsvegur-Óluvugøtu.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur arbeitt við øðrum vegaloysnum á vegamótinum. Greitt verður frá hvørjari loysn kommunan kundi arbeitt eftir.
Settar eru 2 mió. kr. av til rundkoyring við Óluvugøtu fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 200.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskot og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**283/11** **<u>2008-1294 (sí eisini j. nr. 2005-2344) PAP</u>**

**<u>Nevndarsamtykt: Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ráðgevingarfyritøkan Rambøll Nyvig hevur gjørt eina ferðslugreining í sambandi við nýggja Innkomuvegin til Havnar, sí j. nr. 2008-1292/1. Í framtíðini verður ársdøgnmiðalferðslan eftir Sundsvegnum umleið 18.000 akfør.

Tekniska fyrisitingin er komin til ta niðurstøðu á innanhýsis fundi, at tað er neyðugt at dagføra verandi vegastrekki frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar. Víst verður til kort av verandi Sundsvegi, sí j. nr. 2008-1293/1.

Neyðugt er at biðja ráðgevingarfyritøku gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum. Eitt tílíkt uppskot er mett at kosta umleið kr. 500.000,-.

Í hesum sambandi fer umsitingin at heita á teknisku nevnd, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta neyðuga peningin til endamálið.

Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi
1. Játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot
2. Skal projekteringsarbeiðið bjóðast út?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot umvegis fíggjarnevndina og býráðið, og at bjóða projekteringsarbeiðið út til fleiri ráðgevar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at fíggingin verður játtað av íløgum í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at flyta kr. 500.000,00 av íløgujáttanini til gøtu til Hvítanes.

**Býráðið 26. mai 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Jan Christiansen,

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt. Í staðin fyri at halda á við projekteringini sambært ávístari játtan í býráðnum 26.05.08 (smb j. Nr. 2008-1294), verður í staðin fyri mett betur, at peningur verður játtaður til keyp av lendi. Samlaði kostnaðurin fyri at fáa útvegað lendi til rundkoyringina er uml. kr. 650.000,-.

**Tilmæli:**
Vísandi til at Føroya Løgting ikki hevur sett pening av til íløgur í innkomuvegin til Havnar, er projektið til dagføring av Sundsvegnum ikki so átroðkandi sum upprunaliga. Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at játta restupphæddina av játtaðu kr. 500.000,- frá 26.05.2008, sum er áljóðandi 385.116,- pr. 1. februar 2009, til mál nr. 2005-2344 til keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið, skal støða takast til um ikki Sundsvegurin skal dagførast til væntandi øktu ferðsluna, ið fer at verða við íbindingina til Sundsvegin. Samstundis skal støða eisini takast til um ikki fjarhitaleiðing skal leggjast frá Berjabrekku at knýta til tónlistarkúlan, mgl. svimjihøllina, Norðurlandahúsið og Gundadalsøkið.

Sum støðan er í dag, eru uml. 800 húski í Hoyvíkshaganum knýtt at fjahitafelagnum, sum fær ókeypis orku frá kommunalu brennistøðini. Umleið 40% av samlaða orkuframleiðsluni verður ikki gagnnýtt, og tískil skuldi verið rúm fyri at veitt orku til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot við útgreinan av kostnaði fyri dagføring av Sundsvegnum við atliti til at leggja nýggjar fjarhitaleiðingar til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Settar eru 2 mió. kr. av til dagføring av Sundsvegnum fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Vísandi til býráðssamtykt frá 8. sept. 2011 um at raðfesta kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at játta kr. 400.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskoti og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Jákup Símun Simonsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli. Einmælt samtykt.

**284/11** **2011-0877**

**Boðanesheimið - alternativ orkuskipan.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært byggiskránni fyri Boðanesheimið er dentur lagdur á at byggja ein sokallaðan lág-orku bygning smbr. orkuklassa 2 í BR-08, svarandi til eina árliga brutto orkunýtslu á 70 kWh fyri hvønn fermetur. Hettar merkir, at herd krøv eru til bæði tættleika og bjálving, umframt at "orkuramman" fyri bygningin skal prógvast í høvuðsprojektinum eftir nærri ásettum reglum.

Afturat hesum leggur byggiskráin upp til alternativa orkuútvinning smbr. pkt. 6.4.4:
"Grøn orkuveiting:
Umframt tilboði við oljufýrdum hitaverki, skal alternativt tilboð gevast við jarðhitapumpu at nøkta samlaða orkutørvin til upphiting og ventilering av bygningi, og upphiting av brúksvatni. Staðseting og tal av holum skal gerast í samráð við Jarðfeingið.

Uppskotið til grøna orkuveiting verður lýst við frágreiðing, principtekning og útrokning av COP-virði, árligari orkusparing og afturgjaldstíð av meirkostnaði."

Í vinnandi tilboðnum frá ArtiCon var alternativt roknað við at borað 25 hol niður á 200 m í økinum kring bygningin og knýta hesi í 4 hitapumpur. Fjarstøðan millum hesi hol er 40 m, svarandi til ein økistørv á uml. 30.000 fermetrar. Meiríløgan er um 1,7 mió.kr., árliga orkusparingin 16 kWh fyri fermeturin og afturgjaldstíðin um 15 ár við grundarlagi í verandi kostnaðarstøði.
Bygningurin er annars sera væl bjálvaður og í høvuðsheitum upphitaður við gólvhita í eini lágtemperatur-skipan (~55$^{o}$), og sostatt sera væl egnaður til eina hitapumpuloysn.

Undir sáttmálasamráðingunum við ArtiCon í nov-des 2010 gjørdist greitt, at neyðugt var at leingja byggitíðina 2 til 3 mánaðir um jarðhitaskipan var vald, orsakað av nógvu holunum, ið skuldu borast í økinum kring bygningin. Kravið um tíðarleingjan, saman við óvissum um m.a. trygd fyri hita-veitingini, tá ongar royndir eru við jarðhita-skipan av slíkari støðd í Føroyum, førdi til, at avgerð varð tikin um at bíða við alternativari orku fyribils.

Síðan byggingin byrjaði hevur bygginevnd og umsiting, saman við arbeiðstakaranum kannað møguleikan fyri burðadyggari loysn í sambandi við eina hitapumpu-skipan, ið ikki nervar verandi bygging. Komið er fram til, at møguleikar eru eystanfyri vegin Yviri við Strond. Vansin er tó, at økið millum sjóvarmálan og vegin er fríøki/friðað øki, ið krevur serstakt loyvið við serstøkum atlitum í samband við inntriv í lendi. Eisini er økið beint yvirav Boðanesheiminum privat ogn, og verður tískil neyðugt at nýta økið sunnanfyri, sum í løtuni verður nýtt til tjaldingarpláss.

Í sambandi við at farið verður yvir um vegin, hevur ein nýggjur møguleiki stungið seg upp, nevniliga at nýta sjóvarhita heldur enn jarðhita. Møguleikin er einastandandi, tí staðsetingin av bygninginum er so lágt og tætt at sjóvarmálanum. Fyrimunirnir við sjóvarhita fram um jarðhita eru, at økistørvurin er sera lítil, bert eitt lítið pumpuhús niðri við sjóvarmálan, og at tað slepst undan at órógva annað øki. Vansin er, at bert ein roynd higartil er gjørd í Føroyum við sjóvarhita, og ongar langtíðarroyndir eru. Tó skal viðmerkjast, at henda eina royndin, eftir ávísar tillagingar, vísur seg at verða sera væleydnað, og teknikkurin aftanfyri skipanina er sera líkur vanliga jarðhita-skipanini og sostatt ikki ókendur.

Bygginevndin hevur tikið avgerð um, at bygningurin ið best møguligan mun verður fyrireikaður til hitapumpuskipan, jarð- ella sjóvarhita, soleiðis, at leiðingar verða lagdar úr fýrrúmi oman til vegin, og pláss er tøkt í kjallara til hitapumpur, vatngoymslutangar o.a., sum krevst í hesum sambandi. Hesar fyrireikingar kosta undir kr. 20.000 at fremja nú og viðføra, at tað seinni slepst undan av grava økið upp inn undir bygningin og gera størri broytingar inni fyri munandi størri kostnað.

Hinvegin metir bygginevndin ikki tað verða hennara avgerð at taka støðu til, um stig skal takast til fult og heilt at fara frá ætlaða oljufýrda hitaverkinum og yvir til eina hitapumpuskipan nú, og saknar einfalt eina politiska støðutakan til spurningin um "grøna orku" sum heild at styðjað seg til.

Verður avgerð tikin um at nýta hitapumpuskipan nú, so kunnu ketlar, oljutangi og skorsteinur fyri uml. kr. 2-300.000,- sparast burtur, tó verður neyðugt við einari eykajáttan á fyribils uml. 1,7 mió.kr. fyri sjálva hitapumpuskipanina, íroknað boran av holum ella pumpuhús.

**Sosiala nevnd 3. mai 2011:** Sosiala nevnd samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina, at taka avgerð um burturav at nýta sjóvarhita sum orkuskipan til heimið og at fáa neyðuga fígging til vega.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og avgreiða spurningin um fígging, tá ið kanningararbeiðið er avgreitt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt og at fíggja meirkostnaðin innanfyri verandi karmar

**Nýtt:**
Forkanningarnar eru nú komnar undir land, og vísur tað seg, at samlaði kostnaðurin verður kr. 4,8 mió. kr., sum er 3,1 mió. kr. meir enn upprunaliga kostnaðarmetingin á 1,7 mió. kr.

Orsøkirnar til meirkostnaðin eru als ikki nøktandi lagdar fram fyri umsitingini, men millum annað er talan um eitt væl størri anlegg, ið framleiðir 240 KW ímóti 125-160 KW, sum upprunaliga upplýst.

Ivasamt er um meiríløgan nakrantíð verður vunnin inn aftur. Tó valdast sjálvandi hvussu oljuprísurin verður í framtíðini.

Sum støðan er nú, so eru tvinnir kostir í at velja:

1: Venda aftur til oljufýrdar ketlar, sum í upprunaliga projektinum. Hetta viðførur smbr. útgreiningum hjá ArtiCon ein meirkostnað á kr. 695.000 fyri forkanningar av grønari orku, umframt ávísa umprojektering. Nevnast skal tó, at møguleiki er seinni at venda aftur til t.d. sjóvarhita.

2: Halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og fáa neyðuga fígging til vega. Verandi íløgujáttan til Boðanesheimið ber ikki eina tílíka meirútreiðslu.

**Sosiala nevnd 6. desember 2011:** Nevndin átalar, at so stórur munur er á uppruna kostnaðarmetingini, sum støða er tikin út frá, og endaliga tilboðnum.

Ein meirluti, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen, vísir til, at tilboðið frá ArtiCon er 3,1 mió. kr. dýrari, og mælt verður tí til at venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum, men at møguligt skal verða at venda aftur til sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, mæla til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í sosialu nevnd og venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum og at møguligt verður at binda í eina skipan við sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmæli frá borgarstjóranum, um at arbeiða víðari við sjóhitaskipan og beina málið í fíggjarnevndina at finna fígging.

**285/11** **<u>2011-2497</u>**

**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2012**

Uppskot frá umsitingini til fundardagar:

| | | |
|---|---|---|
| 26. januar | 13. september | |
| 23. februar | 27. september | fíggjarætlan |
| 29. mars | 01. november | |
| 02. mai | 29. november | |
| 31. mai | 20. desember | |
| 28. juni | | |

**Býráðið 14. desember 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**286/11** **2008-3883**

**Frávik frá "Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privat bústað" í sambandi útstykking 300 við Myllustjørn. (eisini nýtt mál).**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við útstykking 300 við Myllutjørn eru tað fleiri keyparar, sum hava latið grundstykkið innaftur, eftir at tey hava undirskrivað fyribilsskjeytið. Hesi ynskja at koma innaftur á grundstykkjalistan á tað plássið, tey vóru á, áðrenn tey fóru av. Ynski er grundað á, at tey meta stykkini vera ov dýr og meta seg ikki hava fingið røttu kunning frá kommununi.

Tá ið grundstykkjalistin varð broyttur í mars 2007 var ein meginregla fyri broytingini, at eingin skal flyta aftureftir á listanum. Koma hesi frá útstykking 300 innaftur, koma fleiri aðrir umsøkjarar á listanum at flyta aftureftir. Nakað av ónøgd kann væntast av hesum.

§ 13 um "Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað" ásetur "*Um tygum taka av tilboðnum um fasta ogn, verða tygum strikað/ur av øllum biðilistum*". Hetta verður umsitið soleiðis, at tá keyparar hava undirskrivað fyribils skjeyti, fara tey av grundstykkjalistanum.

Ein onnur umsitingarlig mannagongd er, at keyparar, sum lata stykkið innaftur, fáa ikki peningin fyri grundstykkið aftur, fyrr enn annar keypari er funnin.

Í útstykkingini 300 eru 63 stykkir. Av hesum eru 59 stykkir boðin út. 12 eru komin innaftur + eini 2 eru á veg. Tey 4 stykkini, sum ikki hava verið boðin út, verða eisini boðin út nú (hesi hava ikki verið boðin út orsakað av ivamáli við lendinum).

Fyrisitingin væntar ikki trupulleikar við at selja grundstykkini. Á bíðilistanum eru í løtuni 1787 umsøkjarar og í hesi tillutanini er kommunan komin til nr. 135.

Fyri at síðistillað bæði tey, sum hava latið innaftur og tey, sum møguliga fara at lata innaftur, verður frávikið galdandi fyri øll tey, sum higartil hava keypt

grundstykkið í Útstykking 300. Frávikið verður ikki galdandi fyri tey, sum framyvir keypa grundstykkið.

**Tilmæli**
Vísandi til, at keyparar meta seg ikki hava fingið røttu kunning frá kommununi, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin fyri snarskivuna til, at Tórshavnar kommuna gevur keypararum av grundstykkjum í Útstykking 300, loyvi at koma uppá grundsstykkjalistan aftur á sama pláss sum tey høvdu áðrenn keypið, tá ið tey lata grundstykkið innaftur.

Eisini verður mælt til, at keypararnir fáa peningin aftur beinanvegin, sum tey hava goldið fyri stykkið, tá ið tey lata stykkið innaftur.

Tilmælini eru bara galdandi fyri tey, sum higartil hava keypt grundstykkir í Útstykking 300.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og kunna øll á bíðilistanum.

**Býráðið 11. september 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur biður um hetta málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Jan Christiansen samtykkja at bjóða nýggjum keyparum inn til verandi útstykking.

Ein minniluti: Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen mælir til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevdina við áheitan um at taka núverandi útstykkingarætlan aftur og gera nýggja útstykking á økinum við 300 fermetrar stórum grundstykkjum.

**Ískoyti:**
Sambært kostnaðarmeting kemur Útstykkingin við Myllutjørn at kosta:

| **Tekstur** | **Kostnaður** | **Kostnaður pr. stykki** |
|---|---|---|
| Samlað upphædd uttan mvg | 36.015.561,89 | |
| Samlað upphædd við 25% mvg | 43.861.177,36 | 696.209,16 |
| Samlað upphædd við 6,25% mvg | 37.976.965,72 | 602.808,98 |

Um Eigarafelagið stendur sum byggiharri, skal eigarafelagið rinda 25% mvg, og kemur hvørt stykkið tá at kosta kr. 696.209,16. Hvør keypari kann fáa stuðul sambært niðanfyri standandi reglum:

Reglarnar eru:
Íalt kann verða søkt um stuðul uppá kr. 150.000 í meirvirðisgjaldi av arbeiðsløn. Fakturin skal útgreinast á tann hátt, at síggjast skal hvussu stórur partur er arbeiðsløn, og hvussu stórur partur er tilfar. Tó er tað so, at er lutfallið millum løn og tilfar soleiðis, at lønarparturin er **størri** enn tilfarsparturin, verður stuðul veittur við í mesta lagi helvtini av meirvirðisgjaldinum av arbeiðsløn og tilfari samanlagt, sí løgtingslóg nr. 58 frá 7. juni 2007 um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði.

Men hetta merkir, at ”kvotan”, sum hvør keypari annars hevur til sítt stykkið, lækkar samsvarandi soleiðis at ein minni upphædd er eftir, tá ið tey fara at byggja sjálvt húsið í og við, at partur av kvotuni er brúkt til byggibúningina og grundina.

Um kommunan stendur sum byggiharri, verður kostnaður fyri hvørt stykkið kr. 602.808,98, umframt at hvør keypari varðveitir mvg-kvotuna á kr. 150.000 í og við at kommunan rindar 6,25% í mvg.

Kommunan hevði komið at lagt út til útlegg undir øllum umstøðum. Vandin er sjálvandi, at kommunan tekur ábyrgdina sum byggiharri, serliga í mun til stoyping av grundini.

Hesin vandi kann minkast við at kommunan ikki stoypir sokkul og ei heldur fínplanerar. Hetta merkir samstundis, at søluprísurin lækkar og at nýggjar samráðingar um arbeiðstøkuna mugu til í og við, at sokkulin aleina kostar umleið 6 mió. kr. Hetta er meira enn tey 15%, sum kommunan hevur loyvi til at regulera tað tilboðsupphæddina við sambært ABF 06. Í og við at sokkulin verður tikin burturúr verkætlanini, fáa keyparar størri møguleika fyri sjálvi at forma húsini. Prísurin fyri fínplaneringina verður kannaður í løtuni.

Um kommunan velur at vera byggiharri, má støða takast til sáttmálan. Lisitatiónin var 24. apríl 2008 og inn komu trý tilboð:

| | | |
|---|---|---|
| P/F J. & K. Petersen Contractors | kr. | 32.815.928,00 |
| P/F Articon | kr. | 31.232.841,93 |
| P/F Hansen & Jakobsen | kr. | 24.840.686,00 |

Tilboðini eru uttan mvg.

UP Verkfrøði spf hevur kannað tilboðini og mælir til samráðingarnar við P/F Hansen & Jakobsen, ið hevur lægsta boð áljóðandi kr. 24.840.686,00 + mvg.

Atlit má takast til fíggjarstøðuna hjá kommununi soleiðis at skilja, at kommunan ikki byggibúnar 63 stykkir og fær ikki selt meginpartin av stykkinum.

Meginparturin av stykkunum eiga at vera seld, áðrenn avtala verður gjørd við arbeiðstakaran. Fyrr var vanligt at siga, at kommunan skuldi hava selt 60%, áðrenn byggibúningin fór í gongd. Hetta svarar til 38 stykkir. Mælt verður somuleiðis til, at keyparar gjalda 40% beinanvegin við undirskriving av fyribils skjeyti og rest tá ið endaligt skjeytið verður tinglýst.

Tórshavnar kommuna hevur ikki tøkan pening til útlegg. Verður kommunan byggiharri eigur tískil eitt byggilán (stuttfreista byggikredit) at útvegast til verkætlanina.

**Spurningarnir eru tískil:**

- Skal Tórshavnar kommuna vera byggiharri?
- Um kommunan gerst byggiharri, skal sokkul og fínplanering takast burturúr verkætlanini?
- Hvussu nógv grundstykkir skulu vera seld, áðrenn byggibúningin byrjar?
- Skal TK taka upp samráðingar við lægstbjóðandi og taka av, um partarnir verða samdir?
- Skal TK fíggja verkætlanina við byggiláni?

Um ikki øll stykkir vera seld áðrenn byggibúningin er liðug, má kommunan leggja nakað út fyri írestandi stykkir.

Serstøk byggisamtykt er góðkend í landsstýrinum. Tó eigur fyrisitingin at taka viðurskiftini upp við Matrikulstovuna fyri eisini "at taka teir í eið", soleiðis at trupulleikar ikki stinga seg upp eftirfylgjandi.

**Tilmæli**

Kommunustjórin, tekniski stjóri og miðfyrisitingarstjórin mæla til:

1. at kommunan verður byggiharri
2. at sokkul og fínplanering verða tikið burturúr verkætlanini.
3. at kommunan skal hava selt 38 stykkir, áðrenn byggibúningin verður sett í verk (áðrenn sáttmáli verður skrivaður við arbeiðstakara).
4. at kommunan tekur upp samráðingar við lægstbjóðandi og um partarnir vera samdir, fær heimild at undirskriva sáttmála sambært omanfyristandandi.
5. at kommunan fær heimild at fíggja verkætlanina við byggiláni, og at hetta eisini er komið uppá pláss, áðrenn sáttmáli verður undurskrivaður.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Umsitingin er biðin at kanna matrikuleru viðurskifini og taka upp samráðingar við arbeiðtakaran.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal samtyktu at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og miðfyrisitingarstjóranum tó so, at kommunan skal hava selt 45 stykkir áðrenn byggibúningin verður sett í verk, sambært punkt 3 í tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at annulera lisitatiónina og at gera nýtt projekt, ið inniber vanlig grundstykkir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
**Byggibúningin av útstykkingini Býlingur við túnum**

Gongdin í hesum málið hevur verið drúgv, og tykist hetta onkusvegna at vera sjálvstykjandi. Soleiðis at skilja, at longri tíð gongur til okkurt ítøkiligt hendir við byggibúningini, meira ivasamir gerast møguligir keyparar, og torførari tykist vera at selja tað tal av stykkjum, sum skal til fyri at byrja arbeiðið.

Býráðið samtykti tann 29. januar 2009, at 45 stykkir skulu vera seld áðrenn byggibúningin verður sett í verk.

Síðan hava stykkini verið boðin øllum á bíðilistanum, eins og tey hava verið boðin í fría almenna sølu í bløðunum tvær ferðir.

Nøkur eru tillutaði afturat, meðan onnur eru latin inn aftur. Í løtuni er støðan tann, at keyparar eru til 31 stykki, men bert fáa hava undirritað fyribils skeyti.

Sostatt vanta keyparar til 14 stykki afturat, og endalig avgreiðsla av søluni, áðrenn byggibúningin kann setast í verk sambært samtyktini frá januar 2009.

**Kostnaðarmeting og uppskot til leist**
Samlaði kostnaðurin fyri byggibúningina er mettur til kr. 31.147.506,51. Hvørt stykki er sostatt mett at kosta kr. 486.679,78.

Í øðrum útstykkingum hevur verið siðvenja at farið er undir arbeiðið, tá 40% av stykkjunum eru seld, og hevur kommunan kravt rentur av keyparum, ið hava ognað sær stykki eftir at arbeiðið er sett í verk, ella er liðugt.

Verða 26 stykki seld í 2009, og verður kravt at keyparar skulu rinda 50% av kostnaðinum við undirritan av fyribils skeyti, so verður samlaða inngjaldið til kommununa frá keyparum:

26 * kr. 486.679,78 *0,5 = <u>kr. 6.326.837</u>

Kr. mió. 6,3 verður mett nokk til at fíggja arbeiðið, ið kann gerast í 2009, meðan liðugtgerðin av byggibúningini má á íløguætlanina fyri 2010.

Treytað av at kostnaðarmetingin heldur, verður tørvurin á íløgum til byggibúningina í 2010 mettur til í mesta lagi 18.493.831,64, sum er kostnaðurin á liðugtgerð av hinum 38 stykkjunum.

Fyri hvørt grundstykki omanfyri 26, ið verður selt minkar tørvurin sjálvandi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, fíggjarleiðarin og leiðarin á snarskivuni mæla til:

1. at fyrisitingin fer undir at avgreiða skeyti og krevur 50% av mettta kostnaðinum við váttan av skeyti, og restina við handan av stykkinum
2. at kommunan setir arbeiðið í gongd, tá 26 stykki (40%) eru seld
3. at keyparar, ið koma afturat eftir at arbeiðið er sett í verk, ella liðugt, rinda kostnað, umframt rentu
4. at fyrisitingin avtalar við arbeiðstakaran at møgulig prísreglulering fellur burtur
5. at kostnaðurin av óseldu stykkjunum verður tikin við í íløguætlanina fyri 2010
6. at kommunan fær heimild at taka lán til neyðugu íløguna í 2010

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov og Jógvan Arge mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at annulera lisitatiónina og at gera nýtt projekt, ið inniber vanlig grundstykkir.

**Býráðið 17. september 2009:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Levi Mørk, Høgni Mikkelsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Greiddi ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen,

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Levi Mørk, Høgni Mikkelsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nú verkætlanin er liðug, er samlaði kostnaðurin kr. 28.708.102. Verkætlanin varð mett at kosta kr. 31.147.507. Verkætanin er sostatt kr. 2.439.405 bíligari.

Tað skal upplýsast, at í roknskapinum er eitt afturhald á kr. 818.000 fyri rokning frá Umhvørvisstovuni fyri matrikulering. Kommunan hevur noktað at rinda rokningina vísandi til, at samsvar ikki er millum rokning og arbeiðsavrik. Væntandi endar málið í rættinum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir fíggjarnevnd og býráðnum til at loka verkætlanina og í fyrstu atløgu rinda keyparum kr. 35.000 aftur. Restin verður goldin um hálvt ár; hetta fyri at tryggja, at allar rokningar verða goldnar.

**Fìggjarnevndin 14. desember 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**287/11** **<u>2011-1576 KF</u>**

**<u>Umsókn frá Andreas Petersen og Jákup Petersen bónda í Kaldbaksbotni um serstaka byggisamtykt fyri Kaldbaksbotn soleiðis, at sethúsini kunnu býtast frá festinum.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Andrias Petersen hevur latið festið, matr. nr. 101 í Kaldbaksbotni, til sonin Jákup Petersen og ætlanin er at umbyggja verandi sethús til tvær sjálvstøðugar bústaðareindir. Fyri at fáa fígging til umbyggingina, er neyðugt at fáa ognarviðurskiftini staðfest.

Í apríl 2010 viðgjørdi byggi- og býarskipanarnevndin eina umsókn um frábýti av eini trøð, har sethúsini standa á, uppá umleið 20.000 $m^2$ frá matr. nr. 101. Samtykt var, at viðmæla frábýti av trøðni, men ikki viðmæla frábýti av sethúsunum grundað á, at tey liggja í 4. grundumráði. (J.nr 2009-2656)

Nú søkja teir um, at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið, soleiðis at sethúsini eisini kunnu frábýtast.

Umsitingin metir at ein serstøk byggisamtykt kann gerast fyri økið rundanum verandi hús, men ikki fyri eitt størri øki har fleiri hús kunnu byggjast. Hetta tí at kloakkviðurskiftini ikki eru í ordan her.

Eisini eigur at verða víst á, at tað eru serligar treytir fyri sundurbýti av húsum í eigaraíbúðir ella tvíhús. Umsøkjarnir kunnu venda sær til byggideildina hjá Tórshavnar kommunu um nærri frágreiðing hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórn og býararkitekturin mæla til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri Kaldbaksbotn, soleiðis at eitt A1 sethúsaøki á uml. 700 $m^2$ verður lagt rundanum sethúsini á økinum samsvarandi kortskjal 1, dagfest 15.11-2011.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2011:** Mikael jacobæus kunnaði um málið. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Jan Christiansen vóru ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fìggjarnevndin 14. desember 2011:** Málið beint í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**288/11** **2005-1244 KF**

**Dagføring av byggisamtyktini í Kaldbak**

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2009:** Útsett til næsta fund.

**Kaldbaksnevndin 13. mai 2009:** Kunnað varð um málið. Fundur verður við byggi- og býarskipanardeildina um byggisamtyktina.

**Kaldbaksnevndin 27. januar 2010:** Málið má takast upp, tí hetta forðar ungum í at búseta seg í Kaldbak. Somuleiðis eru eingi tøk vinnustykkir í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndn 24. november 2010:** Málið varð umrøtt og verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Kaldbaksnevndn 23. februar 2011:** Michael Jacobæus kunnaði um málið og legði fram kort yvir møguligar bústaðarmøguleikar. Umsitingin saman við limum í staðbundnu nevndini arbeiða víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur nú havt nakrar fundir við limirnar í staðbundnu nevndini fyri Kaldbak, har ymiskar møguligar broytingar í byggisamtyktini hava verið umrøddar. Semja var um at gera uppskot um nakrar smærri broytingar fyrst, og samstundis at gera eitt uppskot til heildarætlan fyri Kaldbak, við fleiri økjum, sum kunnu leggjast afturat byggisamtyktini tá ið hetta verður neyðugt.

Ætlaðu broytingarnar av byggisamtyktini eru, at markera nøkur økir uppat verandi býlingum á Gørðum og við Á, sum kunnu útstykkjast til sethús. Talan er um uml. 15-17 grundøkir. Eisini er ætlanin at leggja eitt D-øki til miðstaðarbygging á uml. 9.500 m vestan- og norðanfyri B-økið við skúlan. Harafturat eru nakrar smærri broytingar gjørdar í tekstinum til byggisamtyktina.

Í heildarætlanini er ætlanin at leggja eitt øki til uml. 10-12 grundøkir millum á Skriðubakka og Mjólkargøtu og eitt øki upp á uml. 15 grundøkir eystan fyri útstykkingin á Fløtum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin viðmælir ætlaðu broytingarnar í serstøku byggisamtyktini (kortskjal 1 dagfest 12.10.2011 og broytingar í byggisamtyktarteksti broytt 12.10.2011) og uppskotið til heildarætlan fyri Kaldbak (kortskjal 2).

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Kunnað var um málið.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2011:** Samtykt at taka undir við broytingini í serstøku byggisamtyktini og borgarstjórin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Kunnað varð um málið, sum verður tikið upp á næsta fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin 17. oktober 2011 og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**289/11** **2008-4678**

**Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-stýrið**

Sbrt. § 4 í kunngerð nr. 49 frá 4. oktober 1965 um góðkenning av viðtøkum hjá interkommunala elektricitetsfelagnum SEV velur umboðsnevndin fyri SEV 7-mannastýri fyri SEV, og fær Tórshavn ein stýrislim. Umboðsmenninir fyri Tórshavn skjóta upp valevni til umboðsnevndina.

Býráðið setur vanliga uppskot fram um, hvørjar býráðið skjýtur upp sum valevni til val av stýrislimi og varalimi.

**Býráðið 20. november 2008:** Skotið verður upp at velja

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Heðin Mortensen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bogi Andreasen, varaborgarstjóri, krevur málið á skrá.

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Heðin Mortensen |

**290/11** **2008-4663**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í sosialu nevnd**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Jákup Símun Simonsen |

| | |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

**291/11** **2008-4664**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í mentamálanevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Halla Samuelsen | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |
| Vagnur Johannesen | Bogi Andreasen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Rúni Djurhuus | Elin Lindenskov |
| Halla Samuelsen | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |
| Vagnur Johannesen | Bogi Andreasen |

**292/11** **2008-4665**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í teknisku nevnd**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jákup Símun Simonsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Jákup Símun Simonsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen |

**293/11** **2008-4666**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |

| | |
| --- | --- |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**294/11** **<u>2008-4668</u>**

**<u>Val av 5 limum og tiltakslimum í heilsu- og umhvørvisnevndina</u>**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| Fastir limir: | Tiltakslimir: |
| --- | --- |
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Vagnur Johannesen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| Fastir limir: | Tiltakslimir: |
| --- | --- |
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| Fastir limir: | Tiltakslimir: |
| --- | --- |
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Rúni Djurhuus | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |

**295/11** **<u>2008-4669</u>**

**<u>Val av 5 limum og tiltakslimum í havnanevndina</u>**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Bogi Andreasen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Levi Mørk | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Jan Christiansen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Rúni Djurhuus | Levi Mørk |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**296/11** **<u>2008-4673</u>**

**<u>Val av 3 limum og tiltakslimum í hýruvognsnevndina</u>**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen | Maria Hammer Olsen |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen | Rúni Djurhuus |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**297/11** **2009-0261**

**Val av 7 limum í nevndina fyri grunnin Aberdeen-Tórshavn**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Maria Hammer Olsen, Levi Mørk, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vórðu Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Maria Hammer Olsen, Levi Mørk, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen.

**298/11** **2009-0262**

**Val av 7 limum í nevndina fyri grunnin Stavanger-Tórshavn**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vórðu Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**299/11** **2009-0263**

**Val av 3 limum í nevndina fyri grunnin Nuuk-Reykjavík-Tórshavn**

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vórðu Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal og Sjúrður Olsen.

**300/11 2006-3283**

**Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**301/11 2009-0272**

**Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini.**

Sambært §50 í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr.64 frá 7.juni 2007, skal kommunustýri velja umboð í skúlastýrini.

2 kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men tá færri enn 20 næmingar eru í einum skúla, skal 1 kommunustýrisumboð veljast. Valskeiðið hjá kommunuumboðunum er valskeiðið hjá kommunustýrinum.

Í Tórshavnar kommunu eru 12 fólkaskúlar. Skúlarnir eru hesir: Argja skúli, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt, Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli, Hests skúli og Nólsoyar skúli.

Í Hests skúla eru færri enn 20 næmingar.

Býráðið skal sostatt velja 23 umboð í skúlstýrini umframt eykaumboð.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu:

**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Venjingarskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Eysturskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Sankta Frans skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Argja skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Hoyvíkar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Kollfjarðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Bogi Andreasen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Nólsoyar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Karlot Hergeirson | Jógvan Thomsen |

**Velbastaðar skúli:**

*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*

Bogi Andreasen Marin Katrina Frýdal
Annfinn Brekkstein Jan Christiansen

**Hest skúli**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Elin Lindenskov Halla Samuelsen

**Skúlin við Løgmannabreyt**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Jákup Símun Simonsen Maria Hammer Olsen
Jan Christiansen Sjúrður Olsen

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vórðu:

**Kommunuskúlin:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Rúni Djurhuus Levi Mørk
Annfinn Brekkstein Jan Christiansen

**Venjingarskúlin:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Halla Samuelsen Elin Lindenskov
Bogi Andreasen Jan Christiansen

**Eysturskúlin:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Elin Lindenskov Halla Samuelsen
Vagnur Johannesen Sjúrður Olsen

**Sankta Frans skúli:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Levi Mørk Rúni Djurhuus
Jan Christiansen Annfinn Brekkstein

**Argja skúli:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Marin Katrina Frýdal Jákup Símun Simonsen
Sjúrður Olsen Vagnur Johannesen

**Hoyvíkar skúli:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*
Jógvan Arge Jákup Símun Simonsen
Jan Christiansen Annfinn Brekkstein

**Kollfjarðar skúli:**
*Fastir limir:* *Tiltakslimir:*

| | |
|---|---|
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Nólsoyar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Jógvan Thomsen |

**Velbastaðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Hest skúli**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jákup Símun Simonsen | Rúni Djurhuus |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

# Mál uttan fyri skrá.

**302/11** **2005-0846/78 BYGM**

**Semja við Heina á Borg í sambandi við afturtøku av byggiloyvi á matr. nr. 1449, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Heini á Borg hevur 29. juni 2005 fingið byggiloyvi til at hækka trom á sethúsum og at gera nýggja taktrom á verandi bilhús.

Byggideildin hevur eftirfylgjandi varnast, at byggiloyvi í sambandi við hækkan av taktromini á bilhúsi ikki er í samsvari við galdandi byggisamtykt, og bað umsøkjara steðga við byggingini, meðan málið varð kannað, j. nr. 2005-0846/11

Umsøkjarin fekk síðan í skrivi boð um at byggiloyvi varð afturtikið, j. nr. 2005-0846/12

Á tveimum fundum millum byggideildina og umsøkjara er komið fram til eina loysn, har takið á bilhúsi verður lækkað niður á upprunarligu hædd og at bygningurin, ið er samanbygdur við bilhúsið verður lækkaður, soleiðis at báðir bygningarnir vera í somu hædd. Partarnir eru vornir samdir um kostnaðarætlanina í sambandi við broytingarnar.

**Fíggjarligt:**
Tórshavnar kommuna kann koma at luttaka í gjaldininum fyri niðurtøku og uppseting við uml. kr. 100.000.

**Skjøl:**
Kostnaðarmeting j. nr. 2005-0846.
Nýggjar tekningar j. nr. 2005-0846.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at geva byggiloyvi til nýggju tekningar og luttaka í gjaldinum fyri niðurtøku og uppseting.

Framløgd var grannaváttan 2005-0846/26 frá Fríðriki Bláhamar um at hann tekur undir við at bygt verður eftir nýggju tekningunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2005:** Nevndin samtykti at geva byggiloyvi sum frávik sambært tekningunum j.nr. 2005-0846/18, og at kommunan luttekur í gjaldinum fyri niðurtøku og uppseting burtur av játtan hjá byggi- og býarskipanardeildini.

-Byggieftirlitið hevur staðfest at bygt verður ikki í samsvari við loyvi frá byggi- og býarskipanarnevndini.

Eigarin hevur fingið álagt at steðga við byggingini, men arbeiðið hevur hildið fram.

Byggieftirlitið hevur heitt á sakførararvirkið at stevna eigaran eftir at taka tað ólógliga bygda niður. Orsøkin er, at nú er víddin av bilhúsinum uml. 100 $m^2$. Harumframt eru brunaviðurskiftini ikki í lagi.Málið er lagt fyri Føroya Rætt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina av málinum í Føroya Rætti var spurningurin um semju ella dóm viðgjørdur. Løgfrøðiligi ráðgevi kommununar mælti til, at biðja um dóm, tí talan var um so stór frávik, bæði hvat viðvíkur bygging í mark og støddin á garaguni, eins og talan var um ólógliga innrætting av parti av bygninginum.

Kjarnin í málinum er, at tekningarnar sum umsøkjarin sendi inn vístu ikki eitt hálvtak móti grannamarkinum. Tá umsøkjarin so eftir at hava fingið byggiloyvi sum frávik heldur uppá, at hálvtakið hevur verið har síðani í 60´unum og hann tók tað sum eina sjálvfylgju at tað bleiv standandi, má sigast at umsitingin og byggi- og býarskipanarnevndin í veruleikanum hava játtað honum byggiloyvi á skeivum fortreytum 15. sept. 2005. Harumframt hava vitjanir á staðnum so eisini víst, at hetta sum fyrr var hálvtak, nú er fult innrættað og blivin ein partur av garaguni, sum nú er uml. dupult so stór sum byggisamtyktin loyvir.

Føroya Rættur hevur felt dóm í málinum millum Heina á Borg og kommununa, og hevur givið kommununi viðhald í, at endaveggirnir undir hálvtekjuni móti grannamarkinum skulu takast burtur, og at rúmið undir hálvtekjuni sostatt ikki kann innrættast.

Heini á Borg hevur kært dómin í Føroya Rætti til Landsrættin, og hevur í hesum sambandi biðið um sýn og meting, har spurt verður um tað tøkniliga ber til at gera tað sum er ólógliga bygt brunatrygt. Niðurstøðan er, at tøkniliga letur tað seg gera, men samstundis viðførir tað so enn størri frávik frá byggisamtyktini enn tað sum higartil er játtað.

Tekniska umsitingin metir kortini, at málið snýr seg ikki um hvørt tað tøkniliga ber til at fremja brunatryggar loysnir, men at kjarnin í málinum er, at umsøkjarin hevur ikki sent inn rættvísandi tekningar, og hevur harumframt bygt ólógliga. Byggiloyvi sum honum er játtað í 2005 er tí givið á skeivum grundarlag. Uttan mun til um tað tøkniliga ber til at fremja brunatryggar loysnir, so merkir hetta, at byggingin krevur enn størri frávik enn tað sum játtað er frammandunan.

Umsøkjarin hevur nú, hóast hann hevur kært dómin í Føroya Rætti til Landsrættin, søkt um at byggi- og býarskipanarnevndin góðkennir garaguna sum hon nú stendur, men við at fremja tey brunatøknligu átøk sum krevjast fyri at byggingin lýkur brunakrøv. Harumframt biður umsøkjarin um at sleppa á fund við byggi- og býarskipanarnevndina at greiða nærri frá málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til umvegis løgfrøðiliga ráðgeva kommununar at svara umsøkjaranum, at nevndin fer ikki at viðgerða nýggju umsøknina frá umsøkjaranum meðan málið er til viðgerðar í Landsrættinum, við tað at onki nýtt er í málinum sum gevur orsøk til at góðkenna tað ólógliga bygda, eins og talan er um størri frávik enn tað kommunan vanliga játtar.

Harumframt verður mælt til at kommunan biður um dóm í Landsrættinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**

Málið hevur verið fyri í Landsrættinum, har dómur er fallin tann 30. oktober 2008. Dómurin sigur m.a.:

*"...Landsretten finder, at Torshavn Kommune er forpligtet til at tage stilling til den foreliggende dispensationsansøgning, før kommunen kan opnå dom for, at Heini á Borg skal fjerne bygningen mellem garagen og skellet...".*

Støða skal takast til umsóknina um frávik, frá Heina á Borg, (tekningar nr. 2005-0846/61, sum er dagfest 18. desember 2007), har biðið verður um at góðkenna hálvtakið, sum er innilokað við skrivstovu og einum rúmi, við at fremja tey brunateknisku átøkini, sum krevjast, fyri at byggingin lýkur brunakrøvini. Ein metingarmaður hevur víst á loysnir til at røkka hesum, og eru loysnirnar settar upp í skrivi, dagfestum 14. september 2007. Umsøkjarin hevur í umsóknini víst á loysn 2. (skrivið liggur í málinum)

**Frá umsitingini**
Støðan í dag er, at tað, sum fyrr hevur verið eitt hálvtak móti mark, møguliga við einum endaveggi, er gjørt til ein tilbygning, við tað at báðir endar eru innilokaðir við vindeygum og at skrivstova er í tilbygninginum.

Tekningarnar, sum innkomnar eru, vísa at breiddin á bygninginum er 2,05 m og longdin er 8,30 m. Hæddin inn við bilhúsveggin er 2,60 m. og út við mark 2,10 m. Tilbygningurin er íalt 17,01m$^2$ til víddar.

Umsøkjarin hevur frammanundan fingið frávik til eitt bilhús, sum er 82,8 m$^2$, sum byggilovi er til. Í tekningunum til ta umsóknina framgekk ikki, at eitt hálvtak ella tilbygningur var millum mark og bilhúsið. Hetta merkir, at frávik skal gevast til:
- Bygning á 17,01 m$^2$ afturat teimun 82,8 m$^2$, sum longu er loyvt til bilhúsið.
- At byggja tilbygning í mark.
- At longdin av bygninginum er 8,3 m. í mark.

Her er ikki talan um bilhús, tí í tí partinum, sum var hálvtak, er nú ein skrivstova og eitt annað rúm. Veggur er ímillum bilhúsið og tilbygningin við vindeyga innan og hurð. Í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu stendur:
*Kap. 4. § 26 stk. 6: Í 3. grundumráði skulu allar byggingar standa fyri seg, t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.*

Um talan var um úthús, kann longdin ikki verða meir enn 8 m. í mark. Í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu stendur:
*Kap. 4. § 26 stk. 6a: Hesir smærru bygningar kunnu verða bygdir nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:*
*a. Longdin á bygninginum móti grannamarki, má ikki vera størri enn 8 m, Vendir bygningurin móti tveimum mørkum, má samlaða longdin ikki vera størri enn 12 m.*

Um talan var um bilhús, skal støddin av bilhúsinum góðkennast av byggvaldinum. Í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu stendur:
*Kap. 4. § 10 stk. 3: Bilskúrur og bilskýli við vídd, ið er størri enn 50 m², skulu í hvørjum einstøkum føri verða gjørd við serstakari góðkenning byggivaldsins.*

Við at geva loyvi kann talan verða um, at avgerðin dannar precedens, har onnur í 3. grundumráði kunnu søkja um loyvi at byggja tilbygningar í mark, og ikki bert úthús e.líkn.

Undir øllum umstøðum má byggingin gerast brunatrygg.

Vísandi til dómin í Føroya Rætti og tilmælið frá løgfrøðiliga ráðgeva kommununar um, at biðja um dóm í Landsrættinum, tí talan var um so stór frávik, bæði hvat viðvíkur bygging í mark og støddin á garaguni, eins og talan var um ólógliga innrætting av parti av bygninginum, eigur støða at takast til fyriliggjandi umsøkn frá eigaranum, um enn størri frávík, soleiðis sum ásett í dóminum í Landsrættinum.

Í hesum sambandi skal havast í huga, at tað frammanundan eru givin stór frávik til hesa bygging, og at kommunan í øðrum málum hevur givið noktandi svar vísandi til, at frávikini gerast ov mong í tali og ov stór. Játtandi svar í hesum málinum kann tí viðføra nýggja rættarsiðvenju (danna precendens).

Viðgerðin í nevndini eigur tí ikki einans at taka støðið í hvørt tað tøkniliga ber til at fremja brunatryggar loysnir, men at kjarnin í málinum er, at umsøkjarin hevur ikki sent inn rættvísandi tekningar, og hevur harumframt bygt ólógliga. Byggiloyvið sum honum er játtað í 2005 er sostatt givið á skeivum grundarlagi, og ein lógliggerðing av tí ólógligt bygda merkir, at byggingin krevur enn størri frávik enn tað sum játtað er frammandunan.

Um nevndin velur bert at leggja tøknilig viðurskifti til grund fyri eini semju, eru hesir møguleikar:

**Møguleiki 1**
At loyva at hálvtakið verður standandi, av tí at tað er bygt áðrenn byggisamtyktin kom í gildið, men at endaveggirnir skulu takast niður, tí tá endaveggir eru, er talan um ein bygning. Vísandi til almennu byggisamtyktina fyri A1 3. grundumráði, Kap. 4. § 26 stk. 6: *Í 3. grundumráði skulu allar byggingar standa fyri seg t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.*
Haraftur at skal fremjast tey brunateknisku átøkini, sum krevjast fyri at byggingin lýkur brunakrøvini. Víst verður til skrivið frá metingarmanninum (er hjálagt).

**Møguleiki 2:**
At ganga umsóknini á møti sum frávik, treytað av at tey brunateknisku krøvini verða uppfylt.

**Tilmæli**
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti, og

at tað í sambandi við byggiloyvið til bilhúsið longu er givið stórt frávik
at tað ikki er bygt sambært upprunaliga byggiloyvinum
at tað er bygt ólógliga afturat tí sum byggiloyvið varð givið til
at talan er sum enn størri frávik um umsøknin verður gingin á møti
at siðvenja ikki er hjá byggimyndugleikanum at geva so nógv og so stór frávik,
at talan er um ein tilbygning - og ikki eitt hálvtak - í mark,
og til almennu byggisamtyktina fyri A1 3. grundumráði, Kap. 4. § 26 stk. 6: *Í 3. grundumráði skulu allar byggingar standa fyri seg t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.*

mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til ikki at ganga umsóknini á møti. Samstundis verður mælt til, at heita á Landsrættin um at taka støðu til krav kommununar um at taka tað ólógligt bygda niður.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Jan Christiansen hevur biðið um at fáa málið á skrá aftur.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2011:** Vísandi til at onki nýtt er í málinum, halda Bogi Andreasen og Jógvan Arge fast við støðu teirra á fundinum 2. mai 2011.

Ein minniluti: Jan Christiansen mælir til at ganga umsóknini á møti sum frávik, treytað av at tey brunateknisku krøvini verða uppfylgt og krevur málið fyri býráðið.

Ein annar minniluti: Elin Lindenskov tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Jan Christiansen hevur biðið um málið á skrá.

**Býráðið 14. desember 2011:** Atkvøtt varð um minnilutatilmæli hjá Jan Christiansen í byggi- og býarskipanarnevndini 30. mai 2011, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Símun Simonsen.

**303/11** **2010-0695**

**Eftirmeting og kostnað av vakstraræltlanini**

Annfinn Brekkstein, býráðslimur, hevur biðið um at fáa málið á skrá við hesum spurningum:

1.
Eftirmeting av vakstraræltlanini fyri kommununa og hvørjar avleiðingar henda hevur havt á td. inntøkuskapanina í kommununi.

2.
Eftirmeta ávirkanina frá kostnaðarmiklu íløguni at gera eina vakstrarætlan fyri komununa - í løtuni sær ikki út til at verða nøkur ávirkan vinnuliga ella í aðrar mátar frá hesari vakstrarætlan.

3.
Hvat eru starvsfólkakostnaðurin íroknað konsulenthjálp og ferðing fyri vakstrarætlanini.

**Býráðið 14. desember 2011:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**304/11** **2011-2863**

**Viðvíkjandi undirskoti á konto 2810 fíggjarligt fríplass**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 200 um dagstovnar og dagrøkt, kann fult ella partvíst fíggjarligt fríplass verða veitt foreldrum, ið ikki sjálvi megna at rinda útreiðslurnar.
Tað vísir seg, at óvanliga nógv foreldur hava søkt um fríplass í 2011. Ein av orsøkunum er, at fleiri foreldur eru farin undir útbúgving. Settar eru kr. 3.500.000

av til frípláss í 2011, men nú tað síðsta útgjaldið er goldið í desember kann staðfestast ein meirnýtsla á kr. 1.365.000.
Fyri at fáa játtanina at javnviga við útreiðslurnar, verður skotið upp at fíggja hetta soleiðis.

| | |
|---|---|
| 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing | kr. 900.000 |
| 3212 Tímar vegna serliga tørv | kr. 228.000 |
| 3312 Summararbeiði hjá skúlaungdómi | kr. 237.000 |
| | kr. 1.365.000 |

Á kontu 3210 er munandi minninýtsla, sum stendst av, at kommunan nærum hevur nøktað tørvin á barnaansing í 2011.
Á kontu 3212 er eisini minninýtsla, og upphæddin, ið mælt verður til at flyta til fíggjarlig frípáss, hevur ikki beinleiðis ávirkan á tænastustigið.
Á kontu 3312 summararbeiði hjá skúlaungdómi eru kr. 237.000 eftir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til, at
- kr. 900.000 á kontu 3210 hjálp vegna vantandi barnaansing
- kr. 228.000 á kontu 3212 tímar vegna serligan tørv, og
- kr. 237.000 á kontu 3312 summarbeiðið hjá skúlaungdómi

verða fluttar á 2810 fíggjarlig frípláss.

**Mentamálanevndin 14. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum.

**Fìggjarnevndin 14. desember 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:25**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |